| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. mars 2019 | Blað nr.: 227<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 28. mars 2019 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 55/19-78/19

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Bjørg Dam
Odd Færø

**LUTTÓKU EISINI:**
Barbara Vang
Sigurð Vang
Eyðna Justinussen
Marius Muller
Jóan Petur Hentze

**LUTTÓKU IKKI:**
Bjørghild Djurhuus

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. mars 2019 | Blað nr.: 228 |
| | | Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 55/19 | 19/01451-1 | Bjørghild Djurhuus farloyvi frá býráðnum | 230 |
| 56/19 | 19/00098-1 | Mál beind í nevndir 2019 | 231 |
| 57/19 | 19/00863-3 | Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2018 hjá Westward Ho | 233 |
| 58/19 | 16/01033-9 | Undirskrivað fyribilsskeyti p12, oman Gil, matr. nr. 135qc, Hoyvík | 235 |
| 59/19 | 19/00899-2 | Víðarisøla av vinnustykki. Mat.nr. 138k, Hoyvík. | 237 |
| 60/19 | 19/00811-2 | Viðvíkjandi nevndarvali til nevndina í P/F Visit Faroe Islands | 239 |
| 61/19 | 19/00945-1 | Eykajáttan til nýggj dagstovnapláss í 2019 | 241 |
| 62/19 | 14/00218-2 | Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan | 244 |
| 63/19 | 18/03747-1 | Stovnsetan av listaráði | 255 |
| 64/19 | 14/04756-36 | Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642) | 257 |
| 65/19 | 17/03195-1 | Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 264 |
| 66/19 | 14/01009-29 | Frítíðarskúlin opin arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, og frítíðartilboð til børn í 3. flokki | 274 |
| 67/19 | 18/02331-1 | Heildarloysn fyri kommunulæknaviðtalur í Tórshavnar kommunu | 292 |
| 68/19 | 18/00992-1 | Lendisgøtur | 300 |
| 69/19 | 19/00558-2 | Træplanting 2019, løguætlan 6275 | 302 |
| 70/19 | 19/00172-1 | Heimsmálini hjá ST - Global Agenda 2030 | 304 |
| 71/19 | 18/03670-2 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 877m við Dalastíg, Tórshavn | 307 |
| 72/19 | 19/00747-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir til C3 øki | 312 |
| 73/19 | 19/00096-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019 | 314 |
| 74/19 | 17/02296-2 | Dagføring og umlegging av kloakk Landaveg Íslandsveg 2. byggistig | 316 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. mars 2019 | Blað nr.: 229<br>Formansins merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 75/19 | 15/01396-2 | Regnvatnsleiðing úr Marknagili - projekt | 318 |
| 76/19 | 18/01776-1 | Nýggj kloakk í Homrum | 322 |
| 77/19 | 14/01352-11 | Arbeiði at dagføra kloakkir í Tórshavnar kommmunu sambært góðkendari spillivatnsætlan til 2015 | 324 |
| 78/19 | 16/04639-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina | 329 |

***<u>55/19 Bjørghild Djurhuus farloyvi frá býráðnum</u>***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 55/19 | 19/01451-1 |

**Málslýsing:**

Bjørghild Djurhuus hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Odd Færø, eru loknar.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Tikið til eftirtektar

# 56/19 Mál beind í nevndir 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 4/19 | 19/00098-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 31/19 | 19/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 56/19 | 19/00098-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☐ Nei ☐

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 57/19 Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2018 hjá Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 64/19 | 19/00863-3 |
| 2 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 57/19 | 19/00863-3 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Roknskapurin fyri 2018 verður latin Tórshavnar kommunu til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2018 verður framlagdur.

Nevndarfundur 22. februar 2019: Roknskapurin varð góðkendur og undirskrivaður.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Mælt verður fíggjarnevndini til at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Góðkent.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt at góðkenna rokniskapin.

| | Býráðsfundur<br>28. mars 2019 | Blað nr.: 235<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 58/19 Undirskrivað fyribilsskeyti p12, oman Gil, matr. nr. 135qc, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 67/19 | 16/01033-9 |
| 2 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 58/19 | 16/01033-9 |

**Upprunin til málið:** Eigarin av matr.nr. 135qc, Hoyvík, ynskir at selja kommununi óbygda grundstykkið.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Talan er um eitt grundstykki í útstykkingini Oman Gil. Vídd. 322m2. Grundstykkið er planerað. Skeytið er tinglýst 21.09.2016.

Eigarin ynskir at lata stykkið innaftur. Grundstykkið varð selt fyri kr. 525.504,00 og verður latið kommununi aftur fyri henda prís.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Umsókn. Kortskjal.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið innaftur, og at selja grundstykkið aftur í fríðari sølu hjá ognarmeklara.

Keypsprísur íroknað tinglýsing verður kr. 531.759,04

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 59/19 Víðarisøla av vinnustykki. Mat.nr. 138k, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 65/19 | 19/00899-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 59/19 | 19/00899-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn dagfest 04.03.2019

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Viðvíkjandi matr.nr. 138k, Hoyvík. Karlamagnusarbreyt.
Vídd á grundstykki er 1.040m2, harav byggifeltið er 628m2.

Byggiloyvi til íbúðarbygning í 3. hæddum fyriliggur í máli 18/01223.

Verandi eigari Sp/f Frami selur grundstykkið til Sp/F Frami bygging, sum ætlandi fullførir verkætlanina um bygging av íbúðunum.

Sambært grein 3 í upprunaskeytinum, sum er tinglýst 07.04.2017, bindur eigarin seg til at byrja sína bygging innan 2 ár frá tí, at skeytið er tinglýst, og kann eigarin ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá kommununi, fyrr enn bygningur sum kommunan kann góðkenna, er bygdur á byggifeltið frá Karlamagnussarbreyt og í minsta lagi 6 metrar inn.

Umsøkjari er byrjaður bygging á grundstykkinum.

Avtalaður søluprísur sambært víðarisøluskeytinum er kr. 1.217.348,00 sum er samsvarandi upprunaprísinum.

Servituttirnir verða teir somu sum í upprunaskeytinum, herundir eisini servituttir um byggifreist.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**. Frávik ímun til tinglýstan servitutt.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**Ongar.

**Skjøl. Umsókn.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mælir til at góðkenna víðarisøluskeytið.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 60/19 Viðvíkjandi nevndarvali til nevndina í P/F Visit Faroe Islands

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 60/19 | 19/00811-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Vísandi til § 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands, verður nevndin í P/F Visit Faroe Islands mannað við 8 nevndarlimum, harav Tórshavnar Kommuna tilnevnir 1 umboð.

Lutfalsval.

**§ 3.** Nevndin skal vera mannað við 7 limum. Limirnir skulu umboða Ferðavinnufelagið, ferðaflutningsfeløg, kommunurnar og mentanina/ítróttin.

*Stk. 2.* Nevndin skal vera sett saman av lyklapersónum innan ymsu økini, og nevndin skal samlað hava teir fakligu førleikar, sum skulu til fyri at røkka endamálinum í § 2.

*Stk. 3.* Aðalfundurin velur nevndarformannin. Aðalfundurin velur hinar nevndarlimirnar soleiðis:

1) Eitt umboð fyri Ferðavinnufelagið, umboðandi ferðavinnuna í Føroyum, herundir gistingarhús, matstovuvinnu, ferðasmiðir v.m.

2) Tvey umboð fyri ferðaflutningsfyritøkur

3) Eitt umboð frá Tórshavnar Kommunu

4) Eitt umboð fyri kommunurnar uttan fyri Tórshavnar kommunu

5) Eitt umboð fyri mentanina ella ítróttin

6) Eitt umboð fyri landsstýrismannin

*Stk. 4.* Áðrenn nevndin setur stjóra, skal landsstýrismaðurin verða kunnaður.

*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin góðkennir starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina til nevnd og lønina til stjórn felagsins.

Í viðmerkingunum til § 3 í lógini er í lógaruppskotinum ásett, at "*nevndin skal vera eitt avgerðarforum, sum stingur út í kortið fyri føroyska ferðavinnu. Tað er týdningarmikið, at tað eru professionell lyklaumboð (t.d. stjórar) innan ymsu økini, sum vegna felag ella myndugleika í størst møguligan mun hava avgerðarheimildir.*"
Víðari verður tað nevnt í serligu viðmerkingunum, at "*Tórshavnar Kommuna tilnevnir eitt umboð fyri kommununa, sum umboðar leiðslu ella annan lyklapersón í kommununi, og sum hevur kunnleika til ferðavinnuna í høvuðsstaðnum.*"

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin mælir býráðnum til at velja 1 lim í nevndina í P/F Visit Faroe Islands.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Atkvøtt varð um uppskotið frá borgarstjóranum um at velja Bjørgfríð Ludvig í nevndina í P/F Visit Faroe Islands, ið varð einmælt samtykt.

# 61/19 Eykajáttan til nýggj dagstovnapláss í 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 82/19 | 19/00945-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 73/19 | 19/00945-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 61/19 | 19/00945-1 |
| 4 Býráðsfundur | | | 19/00945-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í fíggjarætlanini 2019 er roknað við í alt 145 fleiri dagstovnaplássum 0-6 ár enn í 2018. Lagt er tó ikki upp fyri teimum plássum, sum nú eru útvegaði í Hoydølum.

Í løtuni verður Býlingshúsið inni á Gøtu og Býlingshúsið í Maritugøtu útbygt, ið samlað geva 24 nýggj vøggustovupláss. Hesi pláss vórðu bjóðað út í heyst í BARN. Børnini eru byrjað í Hoydølum 1. februar, og so skjótt útbyggingarnar eru lidnar her í vár, flyta børnini til teirra stovn.

Fíggjartørvur til hesi 24 vøggustovuplássini er í alt kr. 2.081.398 fyri 2019 býtt soleiðis: konta 3119 Býlingshúsið inni á Gøtu kr. 1.040.699 og konta 3137 Býlingshúsið í Maritugøtu kr. 1.040.699.

Útbyggingarnar av ávikavist Dagstovninum á Hamrinum og Býlingshúsinum vesturi á Flat eru í útboð og ætlast arbeiðstøkusáttmálar at verða gjørdir og samtyktir í mai. Í hesum ætlanum koma uml. 88 nýggj dagstovnapláss aftrat býtt soleiðis: Dagstovnurin á Hamrinum 12 vøggustovupláss og 20 barnagarðspláss, og Býlingshúsið vesturi á Flat 36 vøggustovupláss og 20 barnagarðspláss – ella í alt 48 vøggustovupláss og 40 barnagarðspláss.
Ætlanin er beinanvegin at bjóða hesi pláss út í BARN, so skjótt endaligu loyvini til lonina í Hoydølum eru latin. Setast skulu starvsfólk, og neyðugt verður ivaleyst at taka børnini inn yvir á ávíst tíðarskeið vónandi frá 1. mai.

Fíggjartørvur til hesi plássini fyri 9 mánaðir er kr. 4.722.599 býtt soleiðis: konta 3118 Býlingshúsið vesturi á Flat kr. 3.141.824 og konta 3140 Dagstovnurin á Hamrinum kr. 1.580.775.

Í sambandi við Lonina í Hoydølum er sett daglig samskipandi leiðsla, ið ikki er fíggjað í fíggjarætlanini, men sum higartil er goldin av kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing. Umframt tørvin á funktiónini er í hesum føri eisini talan um, at kommunan er bundin til at geva leiðara, ið hevur verið í farloyvi frá leiðarastarvi í sambandi við politiskt starv, eitt sambærligt starv sum tað, hann hevði. Samlaður kostnaður er uml. kr. 540.000 fyri 2019, hetta við støði í lønarsáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið.

Samlað er sostatt ein eykajáttanartørvur uppá kr. 7.343.997. Vísandi til, at omanfyri nevndu 88 plássini ikki eru bjóðað út í BARN enn, skulu í øllum førum kr. 2.621.398 játtast til virksemið, sum í dag er í Hoydølum, leiðaraløn íroknað.

Játtan er ikki tøk til endamálið á grein 3 Børn og ung í fíggjarætlanini.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. mars 2019 | Blað nr.: 242<br><br>Formansins merki: |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini vísa á eykajáttanartørvin og mæla til beinanvegin at játta kr. 2.621.398 sum eykajáttan soleiðis: konta 3119 Býlingshúsið inni á Gøtu kr. 1.040.699, konta 3137 Býlingshúsið í Maritugøtu kr. 1.040.699, og konta 3215 Aðrar útreiðslur kr. 540.000.

Harumframt verður mælt til at játta aðrar 4.722.599 sum omanfyri lýst til plássini, ið ætlast at byrjað í Hoydølum seinni í vár.

Fyrisitingin hevur ikki játtan at vísa á innan grein 3 í fíggjarætlanini.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019**: Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at játta kr. 2.625.000 sum eykajáttan at býta soleiðis: konta 3119 Býlingshúsið inni á Gøtu kr. 1.042.500, konta 3137 Býlingshúsið í Maritugøtu kr. 1.042.500, og konta 3215 Aðrar útreiðslur kr. 540.000.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta kr. 2.625.000 av tøkum peningi, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 62/19 Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 132/16 | 14/00218-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 210/16 | 14/00218-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 280/16 | 14/00218-2 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 237/16 | 14/00218-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 243/16 | 14/00218-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 296/16 | 14/00218-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 33/17 | 14/00218-2 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 72/17 | 14/00218-2 |
| 9 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 113/17 | 14/00218-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 220/17 | 14/00218-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 231/17 | 14/00218-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 141/18 | 14/00218-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 196/18 | 14/00218-2 |
| 14 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 117/18 | 14/00218-2 |
| 15 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 248/18 | 14/00218-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 49/19 | 14/00218-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 74/19 | 14/00218-2 |
| 18 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 62/19 | 14/00218-2 |

**Málslýsing:**

**Mál nr. 14/00218 – Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan**

Á kontu 5475 Býarbókasavnið (íløgur) fyri 2016 eru játtaðar 3.000 tkr.

Í 2014 varð fyrireikingararbeiði gjørt viðvíkjandi út- og umbygging av Býarbókasavninum (BBS). Sí hjálagt skjal 1 og skjal 2 við uppskoti til verkætlan, ið Sp/f Árni Winther Arkitektar stóðu fyri. Sí eisini hjáløgdu ársfrágreiðing og mál- og avriksavtalu hjá BBS – skjal 3 og 4.

**Ætlan og kostnaðarmeting**
Heildarætlanin varð tá mett til 37 mió. kr. íroknað innbúgv v.m. Umsitingin og BBS meta, at uppskotið sum heild er gott og kann vera grundarlagið fyri víðari viðgerð.

**Stuðul frá landinum sbrt. § 15, stk. 2 og 3 í bókasavnslógini**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið viðvíkjandi stuðli. Lógin ásetur, at landið veitir upp til 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging. Neyðugt er, at landsstýrismaðurin í mentamálum góðkennir verkætlanina eftir tilmæli frá Landsbókasavninum og sum skilst eisini Landsverki. Við atliti til at fáa greiði á fíggingini er neyðugt sum skjótast at fáa sent prinsipiella umsókn til Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, soleiðis at landið kann fyrireika játtan til endamálið í 2017-2019/20. Um støði verður tikið í § 15, stk. 3, er býtið millum kommununa og landið umleið 18,5 mió. kr. í part, og um landið rindar yvir 4 ár, so umleið 4,6 mió. kr. um árið árini 2017-2020. Við fyrivarni fyri at landið góðkennir allar útreiðslurnar!

**Bygging í stigum og aðrar fyritreytir**

Av tí at BBS framhaldandi skal virka so ótarnað sum gjørligt og við atliti til, at umbyggingin órógvar starvsfólk og viðskiftafólk sum minst, er ætlanin at fremja verkætlanina í stigum. Ein týðandi fyritreyt fyri tí er, at greiði verður á, um og nær KT-deildin og fíggjardeildin flyta úr bygninginum, tí tað vil geva betri pláss til umbyggingina.

Byggistigini eru hugsað at kunna verða framd soleiðis:

| Ár/ stig | Ætlan | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **2016/17** | • Kjallari innrættast og takast í nýtslu sum opin goymsla (Bøkur flytast av goymslu á 4. hædd + Eysturskúlanum til kjallaran).<br>• Byrja at umvæla tekju, útveggir og takpall sambært ætlan.<br>• Starvsfólk flyta niður á 2. hædd út móti Sverrisgøtu/Káta Horni, har fyribils skrivstovukjarna kann vera, meðan arbeiðið fer fram.<br>• Núverandi skrivstovuhølir kunnu takast upp í útlánið á 2. hædd og geva rúm fyri bókum frá Sverrisgøtu.<br>• Byrja at umvæla og innrætta 4. hædd til barna- og ungdómsdeild. | *Lyfta og trappuuppgongd skulu umvælast eisini.*<br><br>*Kunnu bøkur úr útláninum evt flytast niður á 1. hædd, meðan arbeiðið fer fram?* |
| **2017/18** | • Framhaldandi umvæling og innrætting av 4. hædd (+ evt hølini hjá Fíggjardeild).<br>• Tá 4. hædd er liðug, ber til at flyta alt virksemið frá Barnabókasavninum av 3. hædd upp á 4. hædd.<br>• Byrja at umvæla 3. hædd sambært ætlan (+ KT-deild).<br>• | *Kjallari, 1. hædd, partur av 2. hædd og 3. hædd fullvirkin, meðan arbeiðið fer fram.* |
| **2018/19** | • Framhaldandi umvæling av 3. hædd.<br>• Tá 3. hædd er liðugt umvæld, ber til at flyta útlánið av 2. hædd upp á 3. hædd.<br>• Umvæling og innrætting av 2. hædd. + 1 nýggja lyftu og trappuuppgongd. | *4. hædd tikin í nýtslu sum barna- og ungdómsdeild, skert ella einki virksemi í útláninum á 2. hædd.*<br><br>*Skrivstovukjarna út móti Sverrisgøtu má flytast, meðan arbeiðið fer fram. Hvar? Evt. partur av 3. hædd.* |
| **2019/20** | • Umvæling og innrætting av restini av kjallara.<br>• 1. hædd liðugt umvælast og innrættast.<br>• **1. apríl 2019 fyllir BBS 50 ár.** | |

## Yvirskipað um Býarbókasavnið

Býarbókasavnið hevur seinastu árini verið í positivari menning. Bókasavnið er ein av mest vitjaðu mentanarstovnunum í kommununi og er eisini størsta fólkabókasavn í landinum. Seinasta brúkarakanning vísir, at 65% av borgarunum í kommununi hava seinasta árið verið á gátt.[1] Hetta er væl meir enn í grannalondum okkara, har miðaltalið liggur um 50%. Eisini síggja vit ein risa vøkstur av vitjandi seinastu 5-6 árini, har talið er vaksið frá 80.000 vitjandi til at tátta í tey 140.000 í 2015. Hetta er ein vøkstur uppá 16% í 2015. Nøgdsemið er stórt millum brúkararnar, og starvsfólkið støðast og trívist væl á arbeiðsplássinum.

Positiva gongdin er ikki uttan orsøk. Hon er neyvt tengd at eini miðvísari menning av bókasavninum sum ein meiri sjónligur og atkomiligur viðspælari í miðbýarøkinum, eitt alsamt meiri nútímansgjørt bókasavn við betri og fleiri tilboðum og tænastum á høgum stigi.

Gongdin kann í stuttum lýsast soleiðis:

Í 2009 keypti Tórshavnar kommuna bygningin á Niels Finsensgøtu 7.[2] Samstundis varð eisini farið undir at endurnýggja og nútímansgera niðastu hædd. Í 2012 stóð veghæddin klár at taka í nýtslu. Í 2012/2013 fekk bókasavnið nýggja leiðslu, har størri dentur varð lagdur á ein meiri málrættaðan bókasavnsprofil. Millum annað fór man burtur frá "ad hoc"- leiðsluhátti til ein meiri stategiskan leiðsluhátt. Bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Farið varð burtur frá tí flata bygnaðinum, og í staðin varð farið yvir til ein bygnað við fleiri ábyrgdarøkjum, sum eisini arbeiða uppá tvørs í toymum. Í 2014 varð eisini varaleiðari settur. Í 2015 varð avgreiðslusamskipari settur. Í 2015 fær Tórshavnar kommuna nýggjan mentamálaleiðara, har samstarvið og dialogurin millum stovn og kommunufyristing verður styrktur. Millum annað verður ein mál- og avrikssáttmáli gjørdur og undirskrivaður, har sett verður út í kortið, hvørji mál og avrik bókasavnið næsta árið skal seta sær fyri at fremja og miða ímóti.

Eitt av fremstu málum og eisini størsta avbjóðingin fyri áhaldandi menning og trivnaði á bókasavninum eru hølisviðurskiftini, sum í verandi líki forða fyri áhaldandi menning.

## Framtíðarkósin

Umframt lógarásettu karmarnar, sum ásetur bókasøvnum at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, so hava nútímans fólkabókasøvn fingið ein broyttan leiklut í mun til áður. Bókasøvn eru ikki longur friðarligar bókagoymslur, men eru vorðin livandi og dynamisk støð, sum laga seg eftir økta og broytta bókasavnstørvinum í nútíðarsamfelagnum. Eitt stað, sum spælir ein aktivan leiklut í lokaløkinum, sum tað í størri mun enn áður er við til at revitalisera og menna. Fyrilestrar, kjak, rúm fyri læring og fordjúpilsi og nógv onnur tiltøk, sum ikki einans snúgva seg um bókaútlán, knýta seg at modernaðum bókasavnsvirksemi.

Hendan gongd hevur eisini merkt virksemið á Býarbóksavninum seinastu árini. Í dag er Býarbókasavnið eitt meiri opið og sjónligt stað, sum eftir førimuni markerar seg úteftir við regluligum tiltøkum, við at vera sjónligt í miðlunum, við eini aktivari heimasíðu og við luttøku í sosialu miðlunum. 1. januar 2015 økti bókasavnið munandi um upplatingartíðirnar. Í dag hevur bókasavnið sostatt opið hvønn dag – eisini sunnudag og gerandisdagar til seint út á kvøldið. Nógv fleiri fólk leita sær á bókasavnið og brúka tænasturnar á staðnum uttan neyðturviliga at fara avstað aftur við eini bók undir arminum.

---

[1] Kanningin varð gjørd 15.03.16. Kanningina gjørdi spyr.fo v/Allani Dalsgarð.

[2] Bókasavnið hevur, síðani tað læt upp í 1969, leigað í alsamt størri pørtum av bygninginum.

Hetta setur onnur krøv til hølisviðurskiftini, sum komast skal nærri inná niðanfyri.

**Býarbókasavnið, verandi viðurskifti**
Í mong ár hava hølisviðurskiftini á Býarbókasavninum ikki verið nøktandi til virksemið tess. Bygningurin er 50 ára gamal, og lítið er gjørt við hann hesa tíðina. Umframt at hølini eru niðurslitin, hevur bókasavnið eisini verið plágað av lekum og blámusoppi, til ampa fyri starvs- og viðskiftafólk. Plásstrot er, bæði til bøkur, viðskiftafólk og starvsfólk.

Bókasavnið eigur umleið 75.000 bøkur o.a. tilfar. Umleið 6.000 bøkur standa á eksternari goymslu vegna plásstrot.

**Bókasavnið $m^2$:**
4. hædd 170 $m^2$ - av hesum: 14 $m^2$ skrivstovur - 40 $m^2$ bókagoymsla
3. hædd 257 $m^2$ - av hesum: 49 $m^2$ skrivstovur (38 $m^2$ avbyrgt øki vegna leka) - 15 $m^2$ bókagoymsla
2. hædd 466 $m^2$ - av hesum: 43 $m^2$ skrivstovur - 14 $m^2$ bókagoymsla
1. hædd 268 $m^2$ - av hesum: 100 $m^2$ lesistova
0. hædd uml. 20 $m^2$.
Tils. 1.161 $m^2$ - av hesum: 106 $m^2$ skrivstovur - 69 $m^2$ bókagoymsla - 100 $m^2$ lesistova

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Niðasta hæddin hevur staðið óvirkin, men í skrivandi løtu er partur av kjallaranum væl á veg til at verða innrættaður til eina opna goymslu. Restin av kjallaranum er goymsluhøli hjá kommunalu húsaumsitingini og kaféini. Undir trappunum í kjallaranum finst avísgoymsla, umframt goymsla av ljóðútgerð.

**1. hædd / veghæddin**
Nýumvæld 2009-2011.
Høvuðsinngongd, kafé, avís- og tíðarritsdeild, avgreiðsla, sjálvavgreiðsla (afturbering og avheinting av bókum v.m.), internetteldur, framsýningarhøli, vesir. Lyfta finst á 1. hædd, sum gongur upp til 4. hædd.

**2. hædd**
Útlánið, ungdómsdeild, skrivstovur, kopirúm, teldurúm, goymslurúm.

**3. hædd**
Barnabókasavnið, barnavesir, lítil inngongd, trappuppgongd við lyftu, skrivstovuhøli (harav er innara hølið avbyrgt vegna lekar og blámusopp), lítið goymslurúm.

**4. hædd**
Skrivstova hjá býarbókavørði, fundarhøli (fyrrverandi íbúð v/ køki, baðirúmi, gongd), lítil køkur, bókagoymsla, gongd, vesi, goymsla til vaskiútgerð og annað. Ein óbrúktur takpallur.

**Komandi hølisviðurskifti**
Verandi hølir, og standurin á teimum, avmarka sum er virksemið. Umvæld og dagførd hølisviðurskrifti fara at bera í sær eitt fjølbroyttari og betri nútímansbókasavn.

Við støði í ynskjum og í samsvari við mál og visjón Býarbókasavnsins gjørdi Sp/f Árni Winther Arkitektar eitt skitsuuppskotslíknandi uppskot í 2014. Uppskotið hevur verið væl móttikið av bæði leiðslu og starvsfólki á Býarbókasavninum, eins væl og umsitingini. Uppskotið gongur eisini teimum ynskjum og treytum á møti, sum eru neyðugar til eitt vælvirkandi bókasavn. Millum annað er hædd tikin fyri broytta bókasavnsleiklutinum við m.a.

- betri lesi- og lestrarumstøðum, sum stuðla upp undir reflektión og djúphugsan
- fundar- og aktivitetsrúm, sum er multifuntionelt og fleksibult
- størri rúmd til børn og ung, eins væl og rørslutarnað
- betri goymsluviðurskifti til bøkur v.m.
- tiltaks- og fyrilestrarhøli, ið kunnu hýsa fleiri tiltøkum
- skrivstovur í eini samlaðari kjarnu, sum stuðlar upp undir arbeiðsgongdirnar

Í stuttum áttu verandi hølisviðurskifti at sæð soleiðis út:

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Bókagoymsla og fyrilestra-/tiltakssalur. Kann eisini nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**1. hædd / veghæddin**
Í stóran mun óbroytt, burtursæð frá rúmligari lyftu og nýggjari trappuuppgongd frá kjallara.

**2. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Lesistova, lesiklivar, samrøðu- og serrúm. Starvsfólkaskrivstovur og fundarhøli kring ein felags kjarna. Lesiklivar kunnu nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**3. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Rúm fyri bókaframsýningum, teldum, kopiering, lesi- og sitiplássum.

**4. hædd**
Barna- og ungdómsdeild. Hølini kunnu deilast upp í eindir og skulu sostatt kunna hýsa fjølbroytta virkseminum á barna- og ungdómsbókasavninum, t.e. stovnsvitjanum, mammubólkum, barnafamiljum, lektiukafe, teldu- og miðlasavn, multirúm til spøl, rørslu, tiltøk og framførslur. Í tilknýti til hetta skal takpallurin eisini takast í nýtslu.
Í uppskotinum er roknað við, at hølini út móti Sverrisgøtu, har Fíggjardeildin og KT-deildin í dag halda til, verða tikin við upp í Býarbókasavnið.

**Býarbókasavnið og miðbýurin – nakrir tankar**
Seinastu árini hevur rákið verið, at bókasøvn verða hugsað inn í og brúkt sum ein týðandi liður í strategiskari býarplanlegging. Bókasavnið er ofta kjarna og miðdepil í at endurmenna og skapa lív í býarrúminum.
Býarbókasavnið liggur í hjartanum í Havnini. Verandi gomlu bygningar seta sínar avmarkingar, men veita eisini serligar møguleikar til at skapa eitt vælvirkandi og innbjóðandi býarumhvørvi. Í gørðum og smogum aftanfyri kunnu skapast nøkur nýggj og spennandi býarrúm.

Við gongugøtuni beint uttanfyri, men eisini við møguligum inngongdum/ gjøgnumgongdum umvegis Vaglið, Tórsgøtu og Sverrisgøtu, eru eisini nakrir serligir møguleikar at skapa eitt meiri livandi býarrúm og at aktivera hesi økir, sum í løtuni ikki verða brúkt. Eitt nú kundu smogur og bakgarðar verið brúktir sum sambindingarlið millum aðrar mentanarstovnar í miðbýnum: Perluna, Reinsaríið, Margarinfabrikkina, Tjóðpallin og Vaglið.

Til ber at hugsa sær, at mørkini millum bókasavn og býarrúm gjørdust meiri flótandi, at man t.d. samantvinnar innara bókasavnið við ytra býarrúmið, eitt nú við partvíst yvirdekkaðum smogum, bakgørðum, sum kunnu nýtast; ikki bert til at ganga ígjøgnum, men eisini til annað uttanduravirksemi. Sostatt kundi bókasavnið verið við til at skapa eina synergi millum ymsu

stovnarnar í miðbýnum, sum kann styrkja um býin sum læringar-, mentanar- og upplivingarrúm.

**Býarbókasavnið sum høvuðs- ella meginbókasavn – nakrir ávegis tankar**
Tosað hevur verið leysliga um, at Býarbókasavnið møguliga í framtíðini kundi blivið eitt høvuðs- ella meginbókasavn fyri allar Føroyar. Í dag er hetta ein deild undir Føroya Landsbókasavni, nevnd Bókastovan, sum er ásett í Bókasavnslógini Kapittul VIII, § 21 og 22.

Stutt um høvuðsbókasavnsvirksemið:

- at samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til skúla- og fólkabókasøvn.
- at skráseta, binda inn og greiða hetta tilfarið til bókasøvnini
- at fremja upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar.
- at skipa fyri eftirútbúgving og skeiðsvirksemi fyri starsvfólki á bókasøvnunum.
- at skipa fyri býti av bókasavnsgjaldinum (t.e gjald til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs bøkur eru til taks á bókasøvnunum).

Til hetta virksemi krevjast hølir og starvsfólk.

Í skrivandi løtu er málið ógvuliga hypotetiskt, og tískil ber illa til at koma við ítøkiligum tonkum og viðmerkingum. Fyrst og fremst krevst ein broyting í verandi bókasavnslóg.
Í øllum førum ber til at staðfesta, at um so var, at Býarbókasavnið skuldi fingið eina slíka funktión afturat, hevði ein ný- og umbygging brynjað bókasavnið enn betur til at taka ímóti hesi avbjóðing. Umbyggingin skal vera framskygd og stuðla undir eina langtíðarætlan fyri Býarbókasavnið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til fyriliggjandi prinsippuppskot við atliti til, at umsókn kann í mai/juni verða latin Mentamálaráðnum og Landsbókasavninum um fígging sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini árini 2017-2020. Samstundis fer umsitingin til fundin í oktober at fyrireika neyvari ráðlegging av verkætlan og tíðarætlan við atliti til at kunna fremja verkætlanina í stigum, herundir gerð av fasadum komandi vetur.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Í juni lat umsitingin umsókn til Landsbókasavnið og Mentamálaráðið sum samtykt á fundi í mentamálanevndini 4. mai 2016. Í skrivi frá Landsbókasavninum hevur umsitingin fingið at vita at Landsbókasavnið hevur latið tilmæli til Mentamálaráðið. Biðið er um partsinnlit í tilmæli, men er svar ikki komið enn.

Í samskifti við teknisku fyrisiting, ið virkar sum byggiharri í byggiverkætlanum hjá Tórshavnar kommunu er avgjørt at tað hevði verið ein fyrimunur fyri víðari tilgongdina at ein samlað byggiskrá fyrilág, ið nakað neyvari enn verandi tilfar nágreinar hølistørv og skrá og í hvønn mun annað virksemi við fyrimuni kann hugsast at verða hýst saman við Býarbókasavninum.

Hóskandi er at seta eina verkætlanrnevnd við umboðum fyri trivnaðarfyrisiting, teknisku fyrisiting og Býarbókasavnið. Nevndin skal verða liðug við sítt arbeiðið innan 1. november 2016.

Ein fyritreyt fyri at umbyggingin og heildarætlanin fyri Býarbókasavnið kann fremjast er at KT-deildin og Fíggjardeildin hjá Tórshavnar kommunu flytir úr bókasavnsbygninginum á Káta Horninum. Ein ætlan fyriliggur at innrætta 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 til at hýsa hesum báðum deildunum. Verkætlanin er mett til kr. 1.262.194, men fígging er ikki tøk.

Á løgukarminum fyri 2016 eru játtaðar kr. 3.000.000 til Býarbókasavnið. Uppskot er tí, at játtan til innrætting hjá miðfyrisitingini í Niels Finsensgøtu 17 verður fingin til vega av játtanini til Býarbókasavnið treytað av, at Býarbókasavnið kann flyta inn í hølini á Káta Horninum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
a) at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá, og .
b) at flyta kr. 1.262.194 av løgukarminum fyri 2016 ætlað Býarbókasavninum til kontu 6109 Húsaumsitingin, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin kemur á fundinum at geva status viðv. umsóknini til mentamálaráðið vm.

**Mentamálanevndin 2. november 2016:** Kunnað varð um status.

**Ískoyti:**
Tilboðini uppá umbygging av 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 eru 736.000 kr. hægri enn upprunaliga mett. Áðrenn arbeiði kann byrja, skal neyðug játtan vera tøk.

**Tilmæli**
Miðfyrisitingarstjórin og trivnaðarstjórin mæla til at játta 736.000 kr. til umbyggingina á konto 6109 umsiting og røkt av bygningum. Fíggja av kontum við avlop í 2016. 200 tkr. Av 1311 Miðfyrisiting, 436 tkr. av 5310 Mentanartiltøk og 100 tkr. av Vinnutiltøk.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Síðani samtyktina hjá mentamálanevndini 4. mai 2016 og umsóknina sbrt. § 15, stk. 3, ið var latin mentamálaráðnum í juni 2016, hevur umsitingin regluliga spurt um málið hjá Mentamálaráðnum (MMR) og eitt tíðarskeið í ár Løgmansskrivstovuna (málsøkið var í uml. 2 mánaðir har) eftir svari uppá umsóknina.

7. september 2017 kemur soljóðandi fráboðan frá MMR:

”Viðvíkjandi umvæling/umbygging av Býarbókaaavninum í Havn.

Til endamálið er sett av á løgujáttanini árini framyvir, soleiðis:

2018: 1.5 mió. kr.
2019: 3.5 mió kr.
2020: 3.5 mió kr.

Hetta er tað, ið arbeitt verður við, sum landsins partur av útreiðslunum.

Endaliga verður hetta ikki samtykt fyrr enn løgtingsfíggjarlógin fyri 2018 er samtykt.”

Nærri greiningar vera annars ikki givnar.

Tað er at fegnast um at MMR kemur við slíkari tilsøgn, tó at henda upphædd er ikki er heilt í samsvar við tað upphædd søkt er um sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini. Umsóknin til MMR var á uml. 17,5. mio.kr. yvir 4 ár.

Byggiskráin fyri verkætlanin er enn í gerð og hevur lutvíst verið bíðað eftir at fáa betri greiði á, hvat fíggjarligt útgangsstøði verður fyri verkætlanina. Ætlandi verður byggiskráin liðug í november og klár til nevndarviðgerð tá.

Ein fyritreyt fyri verkætlanini er at KT-deildin og Fíggjardeildin flyta úr bókasavnsbygninginum. Tann verkætlanini er í gongd og verður ætlandi liðug um fáar vikur.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða fráboðanina frá MMR við atliti til at umsitingin kemur við nærri tilráðing til komandi fund.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka við tilsøgnini frá MMR, men samstundis taka upp samskiftið við MMR um møguliga játtan árini 2021 og frameftir, soleiðis at komið verður uppá fullu upphæddina søkt er um.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Í 2016 varð samtykt ein heildarætlan fyri umbyggingina av býarbókasavninum. Í einum ískoyti frá 2017 er skrivað, at ein fyritreyt fyri ætlanini er, at KT-deildin og Fíggjardeildin flyta út av 3. og 4. hædd á Káta Horninum. KT-deildin og Fíggjardeildin eru nú flutt úr hølunum, men fyrisitingin hevur brúk fyri at hava skrivstovur á 4. hædd.
Deils er ætlanin at siga upp leigumálið í Niels Finsens gøtu 31, sum er hølini, ið húsa umsitingini hjá Heilsu- og Umsorganarstænastuni, soleiðis at fyrisitingin kann flyta tættari uppat restini av fyrisitingini í kommununi. Hetta hevur við sær eina sparing í leiguútreiðslum uppá kr. 265.200 um árið.

Harumframt skal pláss gerast til ein stjóra aftuat í ráðhúsinum, og hetta merkir, at staðsetingar av fólki í pørtum av fyrisitingini mugu umskipast.

**Tilmæli:** Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at samtykja, at heildarætlanini fyri umbyggingina av Býarbókasavninum ikki fevnir um 4. hædd á Káta Horninum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá**.**

**Ískoyti**:
Skriv er komið frá starvsfólkunum á Býarbókasavninum í sambandi við framtíðarætlanir fyri Býarbókasavnið (sí hjálagt).

Arbeiðið við at gera byggiskrá sum samtykt á býráðsfundi 12. september 2016.

Arbeiðið við byggiskránni hevur ligið stilt síðani á sumri 2017, men er júst tikið uppaftur og er væntandi at eitt uppskot verður klárt til viðgerð í nevndini seinni í juni 2018 og sum síðani kann latast starvsfólkunum o.ø. til hoyringar. Endaliga byggiskráin verður síðani ætlandi løgd fyri nevndir og býráð til viðgerðar í august. Játtanin til verkætlanina er umleið 1 mio.kr. í 2018, umframt tilsøgnin um stuðul frá mentamálaráðnum á 1,5 mio.kr.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka kunningina til eftirtektar, og at 4. hædd á Káta horninum skal vera partur av byggiskránni sum upprunaliga ætlað í heildarætlanini.

**Ískoyti**:
Uppskot til byggiskrá fyri verkætlanina er til endaliga hoyring hjá Býarbókasavninum og starvsfólkunum har - sí hjálagt uppskot.

Til fundin 11. september 2018 verður ætlandi endaliga byggiskráin latin til viðgerðar hjá nevndum og býráð.

Umsitingin gjøgnumgongur á fundinum høvuðspunktini í uppskotinum og týðandi spurningar sum støða skal takast til.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin kunnað um byggiskránna.

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Kunnað varð um byggiskránna.

**Ískoyti**
Umsitingin hevði 1. februar 2019 havt fund við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið um støðuna í málinum.

Útmeldingin og niðurstøðan frá stjórnarráðnum er fylgjandi:
- Talið 8 mio.kr í § 15, stk. 3 stuðli er áleið tað sum lagt verður upp til.
- Grundleggjandi bygningsrøkt og ábøtur á tað metir ráðið ikki kemur undir § 15, stk. 3.
- Ráðið tekur undir við at gjørd verður eitt nýggja stigvís ætlan, ið síðani aftur skal góðkennast av Landsbókasavninum og sendast Landsverki sum bygningsráðgeva hjá mentamálaráðnum til metingar.
- at ráðið metir (við støði í meting hjá Landsverki) at metingin um verkætlanina er óv lág.

Í samtyktu løgtingsfíggjarlógini fyri 2019 stendur “Eingin játtan er til endamálið í 2019, men 1,5 mió. kr. verða eftir ætlan játtaðar í 2020, 1,5 mió. kr. í 2021 og 3,5 mió. kr. í 2022.”

Á fundinum var spurt um hvørt játtanin sum var fyri 2018 á 1,5 mio.kr. kundi flytast til 2019 so gongd kann koma á nakrar umbyggingar v.m. Ráðið skuldi kannað málið og ísofall leggja tað fyri í eykafíggjarlógini á várið 2019.

Við hesum tykist verða rættiliga greitt hvørja støðu verandi landsstýrið hevur til málið. Tískil er helst ikki annað at gera enn at fara undir at tillaga verkætlanina soleiðis at hon kann fremjast stigvíst og innanfyri teir givnu fíggjarkarmarnar komandi árini. Umsitingin og Býarbókasavnið meta at ein stigvíst ætlan er tað mest ynskiliga, bæði soleiðis at bókasavnið kann vera ein virkin stovnur hesi árini, umframt at fíggjartørvurin kann vera sámuligur og lagdur yvir nøkur ár.

Til fundin 13. mars er ætlanin at hava eina lidna byggiskrá klára íroknað eina stigvíst ætlan fyri umbyggingini og umvælingunum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at gera nýggja tíðarætlan fyri gerð av byggiskrá og stigvísari ætlan. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 63/19 Stovnsetan av listaráði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 11/19 | 18/03747-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 43/19 | 18/03747-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 42/19 | 18/03747-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 75/19 | 18/03747-1 |
| 5 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 63/19 | 18/03747-1 |

**Upprunin til málið:**
Forkvinnan í mentamálanevndini Gunvør Balle.

**Samandráttur**
Ætlanin er at stovnseta eitt ráðgevandi listaráð í sambandi við list í býarrúminum og at virksemi hjá verandi listabólki verður skipað í einari samlaðari reglugerð og skipan.

**Lýsing av málinum**
Visjónin fyri Tórshavnar Listaráð er, at Tórshavnar kommuna við greiðum listaprofili kann geva kommununi enn størri dám av serligum estetiskum samleika og verða kend sum ein kommuna við livandi list og serstøkum býarrúmum, ið kunnu stuðla undir visjónini um okkara høvuðsstað – virkin og vakin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál 17/04195 Stovnsetan av ráðgevandi listaráði.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongi.

**Umhvørvisárin**
Avmarkað.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐
Fundarpeningur verður latin uttanhýsis limunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja uppskotið. Málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Útsett til næsta fund.

**Ískoyti**
Hjálagda uppskot er ein roynd at gera eina samlaða reglugerð og skipa eitt nýtt ráðgevandi listaráð í mun til býarrúm og samstundis varðveita verandi listabólk, ið stendur fyri ítøkiligum útboðum og innkeypi av list.

Útyvir ráðgeving um list, er eisini hugsanin at møguleiki skal vera fyri at spyrja ráðið um ráð í mun til onnur mál og verkevni innan mentan og list.

Málið hevur avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar. Uttanhýsis umboðini fáa fundarpening sbrt. galdandi reglum.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við uppskotinum og beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Odd Færø, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

## 64/19 Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 201/14 | 14/04756-36 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 81/17 | 14/04756-36 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 221/17 | 14/04756-36 |
| 4 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 233/17 | 14/04756-36 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 231/17 | 14/04756-36 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 260/17 | 14/04756-36 |
| 7 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 262/17 | 14/04756-36 |
| 8 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 32/19 | 14/04756-36 |
| 9 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 29/19 | 14/04756-36 |
| 10 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 10/19 | 14/04756-36 |
| 11 Mentamálanevndin | | | 14/04756-36 |
| 12 Fíggjarnevndin | | | 14/04756-36 |
| 13 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 64/19 | 14/04756-36 |

### Málslýsing:
Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggaræltlanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Neyðugt er nú av álvara at seta gongd á fyrireikingarnar til golfbreyt á Glyvursnesi, skal breytin verða liðug í góðari tíð undan oyggjaleikum.

Gjørd er arbeiðsætlan, har eisini Tórshavnar Golfklubbi og Ítróttasamband Føroya taka lut í fyrireikandi arbeiðinum. Arbeiðið í hesum fyrsta stiginum fevnir serliga um at fáa avklárað lendisspurningin, um at menna konsept fyri sjálva golfbreytina bæði ítróttaliga, arkitektoniskt, umhvørvisliga (eitt nú burðardygg vatnveiting, flora v.m.), ferðavinnuliga og fíggjarliga, herundir skipan av rakstri, rakstrarætlan og møguleikar fyri eksternari íløgufígging, og um samstarv við útlendskar partar og serfrøði bæði í Skottlandi, Íslandi og Danmark, har fleiri viðkomandi sambond longu eru knýtt.

Annað áleikandi mál er, at ferðslan eftir vegnum frá Hamrinum og til golfvøllin á Glyvursnesi er nógv økt. Vegurin er tó í slíkum standi, at tað gevur teim koyrandi trupulleikar. Gjørd er kostnaðarmeting at fáa lagt avfresað asfalt eftir vegnum, og kemur hetta at kosta um kr. 50-75.000.

Á íløgukontu 5775 ítróttaranlegg eru kr. 4,6 mió tøkar til golfbreyt. Til tess at fáa fyrireikingarnar í gongd verður mett neyðugt við játtan kr. 500.000, harav játtan eisini kann verða brúkt til avfresa asfalt í mesta lagi upp til kr. 75.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 5775 ítróttaranlegg til L57016 Golfvøllur ætlað omanfyri nevndu endamálum.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært roknskaparkunngerðini, sum fekk gildi fyri Tórshavnar kommunu 1. januar 2010, skulu tilsagnir um stuðul rakstrarførast í tí ári, tær eru latnar, og upphæddin skal innroknast sum ein skylda í ársroknskapinum. Í grannskoðaraprotokollini fyri ársroknskapin hjá kommununi fyri árið 2011 er tann viðmerking, at játtanin í hesum máli kr. 3,3 mió kr. á kontu 5370 Stuðul til íløgur er ikki innroknað í roknskapin, men einans upplýst sum skylda.

Grannskoðaraprotokollin mælir til, at omanfyri nevnda tilsøgn, sum er frá 1999, verður viðgjørd av nýggjum.

Stuðulin var í síni tíð játtaður felagnum til at byggja ein golfvøll ovaliga í Hoyvík. Henda ætlan er ikki longur aktuel. Hinvegin hevur býráðið sett í gongd verkætlan at fyrireika og byggja

golfvøll á Glyvursnesi, sí kontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur. Vísandi til, at upprunatilsøgnin 3,3 mió vórðu ætlaðar til golfvøll, verður mælt til, at henda játtanin verður broytt og játtað til aktuellu verkætlanina á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta tilsøgnina um stuðul kr. 3,3 mió soleiðis, at upphæddin verður játtað til kontu 5775 L57016 Golfvøllur.

**Mentamálanevndin 17. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur hevur saman við golfvallararkitekti fyrireikað og ment uppskot til konsept fyri golfvølli á Glyvursnesi. Harumframt er gjørt eitt verkætlanaruppskot, herundir designuppskot til golfvøll við 18 holum og driving range v.m. við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri íløguna, umframt rakstrarmeting, sí frágreiðing latin býráðnum í juni 2013.

Frágreiðingin gevur somuleiðis eina innleiðslu í golf sum ítrótt og frítíðarítriv, møguleikarnar á Glyvursnesi eins og tey atlit, sum tikin eru í mun samfelagsliga, fíggjarliga og umhvørvisliga burðardygd.

Verkætlanin er tengd at ætlanini um oyggjaleikir í Føroyum í 2019, sum tíðarætlanin tí byggir á, men alt verkætlanaruppskotið røkkur longri og breiðari enn tað og vísir m.a. á teir ágóðar, sum golfvøllurin kann hava fyri ferðavinnuna.

Víst verður somuleiðis á, hvussu golfvøllurin endurskapar lendið, sum í sjónligan mun er ávirkað av grótbrotinum, og hvussu verkætlanirnar við golfvølli og útbyggingin av Tórshavnar havn kunnu samskipast og fáa gagn av hvør aðrari. Grótbrotið ætlast brúkt til venjingarvøll, viðlíkahaldsbygningar og parkering v.m. Neyðugt verður tí at broyta avgerðina um at brúka grótbrotið til tyrvingarpláss og onnur staðseting av tyrvingarplássi finnast.

Til tess at koma víðari, er neyðugt við prinsippgóðkenning av verkætlanaruppskotinum, herundir at fáa gjørt ráðgevaraavtalu við golfvallar-arkitektin, sum lið í klárgering til útboð og arbeiðstøkur. Samstundis verður arbeitt við at fáa neyðugu loyvini til lendið. Harumframt skal setast bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsippgóðkenning av konsept- og verkætlanaruppskotinum, at gjørd verður ráðgevaraavtala við golfvallararkitektin, og at sett verður bygginevnd til verkætlanina.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fara í samráðingar við landsmyndugleikarnar um tess lut í verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini ynskja hetta málið á skrá.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 09. September 2013:** Kunnað varð um málið.

- Kunning.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Síðst í juni 2013 sendi Tórshavnar kommuna umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 fermetra stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll, hetta samsvarandi heimild í lógini um landsjørð § 7a.

Liðin eru skjótt fýra ár, har samráðingar hava verið millum Tórshavnar kommunu og Fiskimálaráðið øðrumegin og festararnar hinumegin. Upprunaavtalan var, at landið skuldi bera endurgjaldskostnaðin, meðan kommunan bar útreiðslurnar at byggja vøllin.
Enn hevur ikki borið til at finna semju um endurgjaldið til tann festaran, sum skal flyta virksemið av økinum og longur suður. Eftir áheitan tilnevndi sorinskrivarin uttanveltaðan metingarmann, men semja fekst heldur ikki um sýns- og metingarskránna, ið er sjálv grundarlagið fyri metingini hjá metingarmanninum.

Ongar veruligar samráðingar hava verið síðani í fjør vár. Í samgonguskjalinum hjá býráðsmeirilutanum er skrivað, at saman við Tórshavnar Golffelag verður farið undir at gera eina heildarætlan fyri golfvølli á Glyvursnesi. Í hesum sambandi verður málið nú tikið uppaftur.

Sum framgongur av málinum omanfyri, fyriliggur eitt verkætlanaruppskot um golfvøll við 18 holum, umframt driving range, ið er staðsett í fyrra grótbrotinum. Uppskotið stóð Edwin

Roald, viðurkendur íslendskur golfvallararkitektur, fyri í samstarvi við kommununa og Golffelagið. Sí hjáløgdu verkætlanarlýsing.

Vøllurin skuldi tá byggjast í einum yvir eitt stutt áramál, tí hann skuldi verða liðugur til Oyggjaleikir 2019. Hetta er ikki longur aktuelt, og tí ber til sum liður í heildarætlan at skipa tilgongdina at byggja golfvøllin øðrvísi og yvir longri tíð.

Hetta er tilgongd, ið Golffelagið sjálvt vísir á sum gongda leið eitt nú soleiðis, at 1-2 hol (breytir) verða bygd hvørt árið, og har ávís upphædd samsvarandi verður sett á íløguætlanina.

Til tess at koma víðari, verður mett neyðugt, at samráðingarnar um leigu av lendinum og endurgjald tí viðvíkjandi verða tiknar uppaftur soleiðis, at málið verður loyst skjótast. Harumframt at heita á golfvallararkitektin um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við umboðum fyri kommununa og golffelagið.

Eingin játtan er tøk til golfvøll á íløguætlanini, men mett verður, at hetta fyrsta fyrireikandi tíðarskeiðið kann haldast innan verandi rakstrarkarmar, og at íløgujáttan verður at koma á fíggjarætlanini frá 2018.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka uppaftur samráðingarnar um leigu av lendinum til golfvøll. Harumframt verður mælt til at heita á golfvallararkitektin, sum í 2013 gjørdi uppskotið til golfvøll, um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við fimm umboðum, har fyrisitingingarnar hava hvør sítt og Tórshavnar Golffelagið hevur tvey.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til heildarætlan og yvirskipaða verkætlartilgongd verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til uppskotið til tillagað verkætlan um bygging av golfvølli, ið løgd varð fram í mentamálanevndini 13. september 2017.

Golfvøllur við 9 holum fyrst
Sbrt. uppskotinum verður hildið fast við heildarætlan um golfvøll við 18 breytum/holum á Glyvursnesi, men har mælt verður til bygging í stigum, har fyrsta stigið er at byggja níggju hol árini 2018-2022, og at tað eftir hetta verður tikin støða til, hvørt farast skal víðari at byggja vøllin út til 18 hol beinanvegin ella seinni.

Fyri at skipa byggiarbeiðið best er tilmælið, at trý hol verða bygd um árið uttan íhald soleiðis, at tað í 2022 eru 9 hol tøk. Hetta hevur eisini tann ítróttaliga fyrimun, at til ber at spæla golf samstundis, har tey fyrstu trý holini væntandi eru klár í 2020, seks hol í 2021 og níggju hol í 2022.

Verkætlanarbólkurin, sum eru fyrisitingarstjórarnir og tvey umboð fyri golffelagið, tekur undir við hesi tilgongd. Henda bygging kann í stórum øll fremjast í tí syðra økinum av Glyvursnesi, sum sambært byggisamtyktini longu er lagt út sum D2 økið, tvs. ítróttarøki. Hetta økið er uml. 270.000 m2.

Kommunan sendi í 2013 samsvarandi áseting í grein 7a í lóg um landsjørð umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 m2 stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll við 18 holum. Við broyttu tilgongdini, har byrjað verður at byggja 9 hol, ber til at tillaga umsóknina um leigu soleiðis, at økið bert fevnir um teir uml. 270.000 m2.

Integrera golfvøll við tyrving og havnarútbygging
Sum liður í heildarætlanini fyri golfvølli við 18 holum, verða í frágreiðingini eisini umrøddir møguleikar at integrera golfvallarútbyggingina bæði við tyrvingarætlanina og við arbeiðið hjá Tórshavnar havn í nýggja grótbrotinum, har mett verður, at til ber at skapa felags ágóðar bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og samfelagsliga.

Fyri golfvøllin ítøkiliga vil tað eitt nú merkja, at til ber at byggja suðureftir, har lendið er ikki so avbjóðandi sum á norðara partinum, og inn í umskapaðu grótbrotini og harvið spara lendi. Í frágreiðingini verður víst á dømi úti í heimi tí viðvíkjandi, og mælt verður til, at ymsu kommunalu áhugapartarnir og polilitiska skipanin viðgera perspektivini í hesum.

Verkætlanarbólkurin tekur sum heild undir við hesi tilgongd, men ásannandi, at talan er um viðurskifti, sum kunnu taka langa tíð, verður mælt til, at politiska skipanin setir út í kortið heildarætlan fyri Glyvursnes, harundir, hvat gerast skal við grótbrotini og møguliga integratión við golfvøllin.

Smart Range
Eisini sum liður í at spara lendi í fyrsta byggistigi, verður í frágreiðingini skotið upp at fáa til vega sonevnt Smart Range, sum er innandura golfsimulator. Smart Range er tilgild loysn, sum í ávísan mun kann koma í staðin fyri ella supplera ein vanligan driving range, sum er stórur og lendiskrevjandi venjingarvøllur.

Fyrimunur við Smart Range er harumframt, at tað nýskapandi háttur at introdusera golfspælið bæði til børn, vaksin og eldri, at skapa forvitni og draga nýggjar íðkaðar til føroyska golfumhvørvið. Ein Smart Range kann setast upp í hølum so at siga hvar sum helst.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við at fáa til vega Smart Range í øllum førum sum partur av fyrsta byggistigið.

Tíðarætlan og kostnaðarætlan
Uppskotið er, at verkætlanin í 2018 verður nærri prosjekterað og designað, at byrjað verður at byggja trý tey fyrstu holini, og at Smart Range verður sett upp í býnum. Í 2019 verða hesi holini gjørd liðug og byrjað verður uppá trý tey næstu. Og so heldur arbeiðið fram soleiðis, at øll tey níggju holini eru liðug og klára at spæla á í 2022.

Samlaði kostnaðurin er mettur til uml. kr. 27 mió, har metti tørvurin fyri 2018 er kr. 4 mió. Harumframt skulu gerast gøtur og amboðsbygningur.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við tíðarætlanaruppskotinum, sum tó má taka støði í teirri fígging, ið játtað verður til golfvøllin hesi árini. Í løtuni er eingin fígging sett av til endamálið burtursæð frá teimum kr. 300.000, ið settar eru av til fyrireikingar í inniverandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at:

- uppruna golfvallarætlanin verður tillagað soleiðis, at bygdur verður golfvøllur við 9 holum, men tó so, at tað skal bera til at byggja vøllin út til 18 hol seinni
- senda Búnaðarstovuni nýggja umsókn um leigu av lendi svarandi til syðra D2-økið á Glyvursnesi, í alt uml. 270.000 m2, ætlað til golfvøll við 9 holum
- fáa til vega nærri politiska støðutakan til møguleikan at integrera næsta byggistig til 18 hol við grótbrotini og samskipast við aðrar kommunalar verkætlanir har til tess at skapa felags ágóðar sum liður í heildarætlan fyri Glyvursnes
- fyrireika útvegan av Smart Range, og at
- ætlan fyri fígging verður løgd í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur seinni.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Útsett.
**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Útsett

## 65/19 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 19/17 | 17/03195-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 229/17 | 17/03195-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 239/17 | 17/03195-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 42/18 | 17/03195-1 |
| 5 Eldranevndin | 09.04.2018 | 1/18 | 17/03195-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 95/18 | 17/03195-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 75/18 | 17/03195-1 |
| 8 Eldranevndin | 04.06.2018 | 2/18 | 17/03195-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 171/18 | 17/03195-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 147/18 | 17/03195-1 |
| 11 Eldranevndin | 10.09.2018 | 9/18 | 17/03195-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 254/18 | 17/03195-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 211/18 | 17/03195-1 |
| 14 Eldranevndin | 05.11.2018 | 15/18 | 17/03195-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 77/18 | 17/03195-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 248/18 | 17/03195-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 332/18 | 17/03195-1 |
| 18 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 270/18 | 17/03195-1 |
| 19 Eldranevndin | 19.03.2019 | 2/19 | 17/03195-1 |
| 20 Eldranevndin | 27.03.2019 | 9/19 | 17/03195-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 28.03.2019 | 94/19 | 17/03195-1 |
| 22 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 65/19 | 17/03195-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýggjan depil til umlætting og samdøgursrehabilitering. Hetta tilmælið verður niðanfyri útgreinað.

Mett verður skilabest við depli við 30 plássum, sum í høvuðsheitum kunnu býtast í 10 samdøgursrehabiliteringspláss og 20 umlættingarpláss, ið tó skal hugsast fleksibult eftir tørvinum hjá brúkarunum.

Í løtuni hevur heilsu- og umsorganartænastan 11 umlættingarpláss og 5 samdøgursrehabiliteringspláss.

Samdøgursrehabiliteringspláss eru stutttíðarpláss til eldri fólk, sum við tilboði um endurmenning í styttri tíðarskeið kunnu fara heim aftur til sín sjálvs at búgva, møguliga stuðlað við heimahjálp. Til samdøgursrehabilitering verður dentur lagdur á at endurmenna búfólkini og geva hjálp til sjálvhjálp gjøgnum venjing og annað.

Rehabiliteringstíðarskeiðið kann vera ymiskt alt eftir støðuni hjá einstaka borgaranum.

Umlættingarpláss eru eisini stutttíðarpláss til eldri fólk, sum búgva heima, men eru illa fyri. Tey koma til umlætting fyri at lætta um hjá avvarðandi, sum eru við til at taka sær av teimum í heiminum. Til ber at fáa afturvendandi umlætting, um mett verður, at tørvur er á tí. Tað er

rættiliga vanligt, at fólk, sum fær tillutað fast røktarbúpláss, fyrst hevur verið til umlætting. Umlættingartíðarskeiði kann vera ymiskt alt eftir tørvi.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, og til ber betri at tálma tørvin á nýggjum røktarheimsplássum. Tað ber eisini betri til at taka ímóti bráðfeingis støðum, liðugt viðgjørdum sjúklingum v.m., og somuleiðis kunnu fleiri stutttíðarpláss tryggja betur visitatión.

Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er hugsaður sum ein deild, har mestsum øll umlætting og samdøgursrehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram.
Við hesi støðd fæst bæði fakligur og tænastuligur fleksibilitetur og skynsamur rakstur.

Í dag fáa umleið 40 fólk um árið gagn av tilboðnum um samdøgursrehabilitering, og vanliga standa eini 10 fólk á bíðilista. Við at økja plássini til 10 pláss, skuldi rúm verið fyri, at 80 heimabúgvandi um árið kunnu brúka samdøgursrehabiliteringstilboðið.

Viðvíkjandi umlætting, so kunnu 10 av teim 30 plássunum verða nýtt til fólk, sum hava afturvendandi tørv á umlætting t.d. 3-4 ferðir um árið. Tá vilja millum 30 og 40 fólk gagnnýta hesi 10 plássini. Higartil í ár (sept. 2017) hevur Heilsu- og umsorganartænastan fingið 224 áheitanir um umlætting. Hetta er bæði frá borgarum, sum hava fingið umlætting í ár, og frá borgarum, sum senda áheitan fyrstu ferð.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur veitt umlætting 157 ferðir í ár. Longdin á teimum 157 umlættingunum, sum hava verið higartil í ár, er ymisk. Tað vil siga, at higartil í ár eru 67 áheitanir, sum ikki eru gingnar á møti.

Restina av teimum 30 plássunum, t.e. eisini 10 pláss, kunnu brúkast til bráðfeingispláss, liðugt viðgjørdar sjúklingar, sonevnd metingarpláss og onnur, sum hava ikki so ofta tørv á umlætting, t.d. bert eina til tvær ferðir um árið.

Upplagt er, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum ikki kunnu fara heim av sjúkrahúsinum, koma á depilin til metingar og til uppvenjing, har tað betri ber til at meta um og staðfesta, hvørt borgarin kann fara heim ella skal hava búpláss á røktarheimi.

Hesin býtislykil millum rehabilitering, umlætting og bráðfeingis pláss er ikki endaligur, men skal júst vera fleksibul í mun til áleikandi tørv.

Við deplinum er møguligt at flyta verandi umlættingarpláss, t.e. 2 á Lágargarði og 2 á Boðanesheiminum, og tey 5 samdøgursrehabiliteringsplássini á Boðanesheiminum, til depilin. Hesi 9 stutttíðarplássini verða so løgd um til føst búpláss, ið tað eisini er tørvur á.

Umframt at fáa 9 nýggj føst bupláss, so ger hetta eisini, at allar røktardeildir í Heilsu- og umsorganartænastuni eru røktardeildir burturav. Hetta er meira skynsamt fyri deildirnar, sum í dag eisini fast hýsa umlætting og samdøgursrehabilitering, tí tað viðførir størri stabilitet og frið við sær.

Við at byggja 30 pláss verður mett møguligt eisini at endurnýggja tey sjey plássini á Umlættingarheiminum í V.U. Hammershaimbsgøtu, tvs. niðurleggja virksemið har. Fysisku karmarnir hava leingi verið ótíðarhóskandi og illa egnaðir til røktartørvandi og demenssjúk fólk, og rakstrarliga er talan um lítla og tí lutfalsliga kostnaðarmikla eind.

Við hesi loysnini verða sostatt: 7 umlættingarpláss endurnýggjað, 9 pláss umløgd til føst búpláss, tá umlættingin flytur í umlættingar- og rehabiliteringsdepilin, og 14 nýggj stutttíðarpláss fingin til vega aftrat teimum, sum eru í dag.

Við deplinum økist dekningsstigið, t.e. lutfallið av búplássum í mun til talið av fólki eldri enn 80 ár, bæði á føstum røktarbúplássum og á stutttíðarbúplássum, sí kolonnu fyri árið 2018 í talvuni niðanfyri, har ætlanin við 8 nýggjum umlættingarplássum til demenssjúk á Tjarnargarði (j.nr. 17/02942) eisini sæst í kolonnu fyri ár 2020.

Verkætlanartilgongd:
Ætlanin er, at depilin skal vera í rakstri seinnu hálvu av 2018. Farast skal tí beinanvegin undir at gera nærri tørvs- og kravlýsing umframt skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, kostnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri eldranevndina í seinasta lagi til nevndarfundin 27. november 2017.

Staðseting og lendið kann hava ávísan týdning fyri bygningsloysn, og tí eigur at verða biðið um staðseting og grundøkið beinanvegin.

Til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. verður mett neyðugt við upphædd kr. 500.000 at játta av tøkum íløgukarmi 2775 eldrarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at byggja nýggjan umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepil við 30 plássum at standa klárt at taka í nýtslu í seinnu hálvu av 2018, og í hesum sambandi:

- at gera tørvs- og kravlýsing og skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, konstnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri nevndina aftur til nevndarfundin 27. november 2017,

- at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting, og

- at játta kr. 500.000 til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. av íløgukontu 2775 eldarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Eldranevndin 02. oktober 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við verkætlanina at byggja ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil hevur býarskipanardeildin arbeitt við møguligum staðsetingum til verkætlanina. Í mun til býarplanleggingina og staðseting av almennum stovnum vísir umsitingin á eitt økið við endan av Rólantsgøtu í Hoyvík, ið liggur náttúruvakurt upp at dalinum Langa, sí kortskjalið *Rólantsgøta_kort.*

Økið er partur av matrikklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri, enn hvat tørvur er á, og skal ein depil til fólk byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast. Byggingin skal somuleiðis skipast í mun til ein byggilinju, ið skal tryggja, at byggingin leggur seg eftir bygda umhvørvinum, og at ein hóskandi frástøða til verandi gøtu og frílendi verður hildin.

Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Soleiðis er ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil ikki í stríð við almennu byggisamtyktina. Men í sambandi við útstykkingar í A3 øki skal serstøk byggisamtykt gerast.

Byggitørvurin á deplinum er áleið 2000m$^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3, og er sostatt tørvur á einum grundstykki áleið 6000-6500m$^2$ til støddar. Talan er um bygging í einari hædd við 30 kømrum við bað og duri, venjingarhøli, uppihaldsøki við serveringskøki, vaskarí, goymslur.

Ein bústaður til umlætting hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Fríøki er nærmasti granni til ætlaðu byggingina, og stuðlar tað væl undir virksemið, at fólk búgva til umlætting í eitt styttri tíðarskeið.

Sama økið var einaferð ætlað til dagstovn í Hoyvík, men er hetta ikki aktuelt longur.

**Skjøl:**
Økið við Rólantsgøtu, journal nr. 17/03195-5
Rólantsgøta_kort, journal nr. 17/03195-6

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at samtykkja nevndu staðsetingina til ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, at sundurbýta uml. 6500m$^2$ av matr.135fe og 138a, at gera nýggja serstaka byggisamtykt og at beina málið í eldranevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina omanfyri.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin mælir til at eldranevndin tekur undir við staðsetingini sum er ávíst og sum er samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini, og at beina málið víðari í fíggjarnevndina og býráðið.

**Eldranevndin 09. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykti at taka undir við Eldranevndini og senda málið til kunningar/viðmerkingar hjá eigarafelagnum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigursson um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing

Til tess at gera tørvslýsingina, ið er grundarlag fyri ítøkiligari byggiskrá, so kvalifiseraða sum gjørligt, er valt at taka brúkaraumboð við servitan innan allar funktiónir við í arbeiðið. Hesi eru ein ergoterapetur, ein fysioterapeutur, ein køksleiðari og deildarleiðarin fyri verandi rehabilitering/umlætting. Harafturat hevur ein eindarleiðari verið við til tess at tryggja skynsemi í rakstri, tá bygningurin er liðugur og tikin í nýtslu.

Í stuttum verður mælt til 28 pláss býtt í tvær lonir. Við støði í hesum er gjørd meting um starsvfólkanormering og rúmskrá, umframt onnur yvirskipað viðurskifti. Talan verður eftir hesum um bygning uml. 1.800 fermetrar.

Sí tørvslýsing í hjalagda skjalið.

Í ætlan liggur at byggja depilin við Rólantsgøtu í Hoyvík. Hoyring hevur verið hjá eigarafelagnum, og er ynskið borið fram um, at bygningurin skal vera í einari hædd og hava flagtekju.

Brúkaraumboð hava serliga lagt dent á at køkur eigur at verða partur av umlættingar og rehabiliteringsdeplinum. Tí umframt tað heimliga og hugnaliga við at matur verður gjørdur á staðnum, so er kostur ein sera týðandi partur av rehabiliteringini og skal tillagast til einstaka borgarar.
Lágargarður er við at vera á markinum fyri hvussu nógvar døgurðar afturat køkurin megnar at gera afturat tí sum verður gjørt í dag.

Bygginevndin hevur góðkent tørvlýsingina, og klárt er tí at fara undir at gera byggiskrá, tíðarætlan og kostnaðarætlan.

Mett verður skilagott, at eldranevndin eisini umrøður tørvslýsinga til tess at tryggja felags fatan um verkætlanina.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla eldranevndini til, at taka undir við tørvslýsingini sum grundarlag fyri víðari arbeiðinum at gera byggiskrá v.m.

**Eldranevndin 04. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Eigarafelagið hevur í hoyringssvari gjørt vart við, at um kommununa velur at brúka økið í Rólantsgøtu til annað enn barnagarð, hevur eigarafelagi rætt til endurgjald.

Umsitingin hevur kannað hetta hjá løgfrøðinginum, sum arbeiddi við avtaluni við eigarafelagið og løgfrøðiliga niðurstøðan er henda:

Kommunan hevur luttikið í útstykkingararbeiðinum og hevur tá goldið fyri 2.500 m2 . Ætlanin var at byggja barnagarð á øki.

Løgfrøðiliga metingin er, at kommunan hevur goldið fyri hetta øki og tí ikki eigur at gjalda einaferð afturat, um kommunan velur at byggja annað enn barnagarð á øki. Um kommunan ætlar at brúka meira enn 2.500 fermetrar, eigur kommunan at gjalda eigarafelagnum fyri tað, sum fer upp um 2.500 fermetrar. Tann kostnaðurin má avtalast nærri við eigarafelagið.

Tann løgfrøðiliga metingin er, at um kommunan ikki fer upp um teir 2.500 fermetrarnar, eigur kommunan ikki at gjalda eigarafelagnum nakað, tí goldið er longu fyri 2.500 fermetrar.

Enn er ikki greitt hvussu stórur ein umlættingar/rehabiliteringsdepil verður og tí er ilt at siga um kommuna hevur tørv á meira enn 2.500 fermetrum. Heldur ikki ber í løtuni til at siga hvat ein evt. kostnaður vildi verið um tørvur er á meira enn 2.500 fermetrum

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og virkandi leiðari á stjórnarskrivstovuni mæla til at Fíggjarnevndin gevur umsitingini heimild at samráðast við eigarafelagi um evt. kostnað um kommunan hevur tørv á lendi sum er størri enn 2.500 fermetrar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við staðsetingini og at heimila umsitingini at samráðast við eigarafelagið um evt. kostnað um lendi størri enn 2.500 fermetrar. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Anfinn Brekkstein.

**Ìskoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi 05.09.18 samtykt at bjóða Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin út sum totalentreprisa ætlandi til tríggjar arbeiðstakarar. Tá bjóðað verður út sum totalentreprisa er vanligt, at tey, sum ikki fáa projektið, verða samsýnt fyri teirra uppskot. Til hetta endamál metir tekniska fyrisiting, at tørvur er á 300.000 kr.

Harumframt er tørvur á at gera lendiskanningar av staðsetingini, áðrenn útbjóðingartilfarið kann gerast liðugt. Til hetta krevst 100.000 kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla eldranevndini til at játta 400.000 kr. til 2775 Eldrarøkt (íløgur) L 27011 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil av 2775 Eldrarøkt (íløgur) L00001 Løgukarmur fyri árið og leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 10. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Odd Færø.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Byggiskráin/útbjóðingartilfarið er í gerð til umlættingar- og rehabiliteringsdepilin. Mett er um heildarkostnað fyri verkætlanina. Sí kostnaðarmeting j. nr 18/03889 Ætlanin er at bjóða verkætlanina út í heildararbeiðsstøku í desember 2018. Tilboðini skulu verða TK í hendi í februar 2019. Mett byggitíð er 18 mánaðir. Arbeiðið at byggja umlættingar- og rehabiliteringsdepilin byrjar eftir ætlan í apríl 2019 og avhending í oktober 2020.

Verkætlanin verður boðin út í heildararbeiðstøku til 3 arbeiðstakarar:

Sp/f Húsavarðartænastuna,
P/F Articon
P/F MT Højgaard.

**Tryggingarviðurskifti:**
Teknað verður all-risk trygging, men ivasamt er um tað ber til at tekna verkætlanarábyrgdartrygging í heildararbeiðstøku sambært tryggingarráðgeva hjá TK.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, Verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjóri mæla til, at umsitingin arbeiðir eftir omanfyristandandi leisti og fær heimild til at fara í sáttmálasamráðingar við vinnandi arbeiðstakara við møguligum tillagingum. Mælt verður somuleiðis til at samtykkja kostnaðarmetingina, sí j. nr. 18/03889. Vísir tað seg, at ein arbeiðstakari meldar frá, verður mælt til, at umsitingin bjóðar nýggjum arbeiðstakara við at veita tilboð. Málið verður lagt fyri aftur eldranevnd, fíggjarnevnd og býráðið til støðutakan eftir sáttmálasamráðingarnar.

**Eldranevndin 05. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Nevndin ynskir at elementir ella modulir kunnu verða positivt nevnd í útbjóðingini sum ein møguleiki, umframt at tilboðsveitarar kunnu koma við einum alternativum uppskoti.

**Ískoyti:**
Sambært ásetingunum fyri A3 øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini skal serstøk byggisamtykt gerast fyri nýggjar útstykkingar. Ásetingarnar fyri útstykkingina við Rólantsgøtu í Hoyvík, sum fevnir um grundstykkir á 300 $m^2$, eru ásettar í skeytið fyri hvørt grundstykkið, og tískil er ongin serstøk byggisamtykt fyri økið. Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin

er partur av hesi útstykkingini, tískil verður kunnað um, at ásetingarnar fyri nýggja stovnin somuleiðis verða ásettar í skeytið.

Økið, sum er samtykt til nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, er partur av matriklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri enn hvat tørvur er á. Eitt øki áleið 4900 $m^2$ skal tí sundurbýtast frá matr. 135fe, umframt at eitt øki áleið 1700 $m^2$ skal sundurbýtast frá matr. 138a til samanlegging við sundurbýtið frá 135fe. Nýggi matrikulin verður sostatt áleið 6.600 $m^2$ til støddar, sí uppskot til sundurbýtið og samanlegging á kortskjalinum *Rólantsgøta_marknaumskipan*.

**Skjøl:**
*Rólantsgøta_marknaumskipan*, journal nr. 17/03195-21.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at sundurbýta eitt øki frá matr. 135fe og 138a at samanleggja til ein nýggjan matrikul áleið 6.600 $m^2$ til nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, sum verður at senda til Umhvørvisstovuna til avgreiðslu, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti og mælir til at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við eldranevndini 5. november 2018 og meirilutanum í teknisku nevnd 27. november 2018 og beina málið í býráðið og málið um sundurbýtið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti og mælir til, at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti og mælir til at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutunum í fíggjarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjøghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Bjørg Dam

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

**Eldranevndin 19. mars 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Eftir at byggiskráin til umlættingar- og rehabiliteringsdepilin (URD) varð liðug, bleiv verkætlanin boðin út 6. desembur 2018, í heildararbeiðstøku til 3 heildararbeiðstakarar, tað er:

- Sp/f Húsavarðartænastan
- P/F Articon
- P/F MT Højgaard.

Tilboðini komu inn 7. marts 2019, og liggja í j.nr. 18/03889-3

Dómsnevnd, mannað við 7 fólkum við viðkomandi førleikum, hevur síðani neyvt gjøgnumgingið øll trý tilboðini og mett tey út frá útbjóðingartilfarinum. Eftir at tilboðini eru gjøgnumgingin og viðgjørd, hevur dómsnevndin gjørt dómsnevndarálit, sum er lagt fram fyri bygginevndina, sum tekur undir við úrslitinum.

Dómsnevndarálitið framgongur á j.nr. 18/03889-4

Um býráðið tekur undir við tilmælinum, er næsta stig, at kommunan fer undir sáttmálasamráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Tá sáttmáli er gjørdur, skal heildararbeiðstakarin gera myndugleikaprojekt í tøttum samstarvi við kommununa og fáa til vega øll neyðug loyvir.

Út frá vinnandi uppskotinum hevur umsitingin gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina, sum er íroknað HVÙ, prosjektumsiting, trygging o.a., sum sæst á j.nr. 18/03889-2.

Ætlanin er at hava framløgu fyri býráðslimunum mikudagin kl. 15.00, har øll uppskotini verða víst fram og har kunnað verður um dómsnevndararbeiðið.

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjórin mæla til:
- at taka undir við dómsnevndarálitinum og fara undir sáttmálasamráðingar og gera sáttmála við vinnandi heildararbeiðstakara.
- at játta kr. 23 mió. í 2019 av tøkum løgukarmi konto 5775 L0001 løgukarmur fyri ári og L0002 framfluttar løgur og at játta restina av kostnaðinum sambært kostnaðarmeting j.nr. 18/03889-2 á fíggjarætlanini í 2020.

at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. mars 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Halla Samuelsen, mælir býraðnum til at taka undir við dómsnevndarálitinum og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Málið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevnd og býráð.

Ein minniluti, Tróndur Siguðsson, tekur undir við at gera ein umlættingardepil, men mælir til at staðseta umlættingardepilin við Stórubrekku saman við barnagarðinum, ið ætlanin er at staðseta har.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari í móti og 5 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson, Odd Færø, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

# 66/19 Frítíðarskúlin opin arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, og frítíðartilboð til børn í 3. flokki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 4/14 | 14/01009-29 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 59/14 | 14/01009-29 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 80/14 | 14/01009-29 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.05.2014 | 124/14 | 14/01009-29 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.05.2014 | 148/14 | 14/01009-29 |
| 6 Fíggjarnevndin | 06.06.2014 | 160/14 | 14/01009-29 |
| 7 Býráðsfundur | 16.06.2014 | 129/14 | 14/01009-29 |
| 8 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 157/14 | 14/01009-29 |
| 9 Mentamálanevndin | 03.07.2014 | 161/14 | 14/01009-29 |
| 10 Fíggjarnevndin | 03.07.2014 | 210/14 | 14/01009-29 |
| 11 Býráðsfundur | 03.07.2014 | 160/14 | 14/01009-29 |
| 12 Mentamálanevndin | 03.09.2014 | 164/14 | 14/01009-29 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 158/15 | 14/01009-29 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 88/16 | 14/01009-29 |
| 15 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 129/16 | 14/01009-29 |
| 16 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 105/16 | 14/01009-29 |
| 17 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 127/16 | 14/01009-29 |
| 18 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 166/16 | 14/01009-29 |
| 19 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 105/17 | 14/01009-29 |
| 20 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 156/18 | 14/01009-29 |
| 21 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 81/19 | 14/01009-29 |
| 22 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 78/19 | 14/01009-29 |
| 23 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 66/19 | 14/01009-29 |
| 24 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 110/19 | 14/01009-29 |

**Málslýsing:**

Áheitan komin frá foreldraráðnum fyri frítíðarskúlarnar í Tórshavnar kommunu um at hava opið arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, harumframt heita tey á kommununa um at víðka frítíðarskúlan til eisini at fevna um 3. flokk.

Umsitingin hevur kannað møguleikan fyri at frítíðarskúlin hevur opið dagar, tá skúlin er stongdur og er komin til ta niðurstøðu, at frítíðarskúlin hevur opið 2., 3. og 4. apríl og 10. til og við 13. apríl. Opið er í summar frá 2. juli til og við 20. juli og eina viku í heystfrítíðini. Harumframt skulu frítíðarskúlarnir hava opið 3 dagar afturat, har hin einstaki frítíðarskúlin lagar seg eftir skúlanum, hann er tengdur at. Mælt verður til, at frítíðarskúlarnir leggja saman í summarfrítíðini og aðrar skúlafrídagar, tá til ber at leggja saman, so øll tey, ið hava tørv á frítíðarskúla, fáa tilboð. Nevndu dagar hevur frítíðarskúlin opið frá kl. 08.00 til 17.00. Tað er uppgávan hjá frítíðarskúlunum at samskipa, hvussu frítíðarskúlarnir hava opið í mun til tørvin. Skipanin verður endurskoðað eftir heystfrítíðina 2012.

Mettur kostnaður at víða upplatingartíðina er kr. 350.000 um árið. Peningurin fer av játtanini hjá dagrøktini, ið leyp av í fjør, orsakað av, at dagrøktin ikki hevði fult tal av børnum í mun til normeringina. Tað er uppgávan hjá frítíðarskúlunum at halda seg til játtanina, ið er sett av til endamálið.

Sum nevnt omanfyri, heita foreldraráðini á Tórshavnar kommunu um at víða frítíðarskúlan til eisini at vevna um 3. flokk. Umsitingin hevur kannað møguleikan og hevur í hesum sambandi havt samband við frítíðarskúlarnar. Ætlanin er at bjóða børnunum í 3. flokki líknandi tilboð, sum vit bjóða í Margarinfabrikkini, t.v.s. eitt frítíðartilboð. Eitt frítíðartilboð hevur nøkulunda tað sama at bjóða sum ein frítíðarskúli, við verkstøðum, ítrótti og møguleika við spæli yvirhøvur. Børnini, ið taka av hesum tilboði ganga frá skúla sjálvi og verða ikki skrásett uppá á sama máta, sum í frítíðarskúlanum. Frítíðarskúlarnir eru ymiskir, t.d. hava vit ein náttúrufrítíðarskúla í Havnardali, við djórum og fríari náttúru. Aðrir frítíðarskúlar hava góða møguleikar fyri ítrótti.

Í løtuni ganga 626 børn í frítíðarskúla, taka vit ein árgang eru tey um 300, tekur helmingurin av børnunum úr 3. flokki av tilboðnum, verða útreiðslurnar frá 15. august kr. 896.250 til 1. januar 2013. Útreiðslurnar til 3. flokk t. v. s. tímar til starvsfólk og rakstur yvirhøvur, eru helmingurin av tí, tær eru til 1. og 2. flokk í frítíðarskúla.

Í flestu førum rúmast børnini í verandi frítíðarskúlum, men neyðugt verður at útvega hølir í ovari parti av býnum. Mettar útreiðslur til leigu fyri 1 ár eru kr. 200.000. Útreiðslur til útgerð og tilfar er kr. 200.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri børn og ung mæla mentamálanevndini at játta kr. 350.000 av konto 3101 hjá Dagrøktini til frítíðarskúlarnar í sambandi við at tey hava opið skúlafrídagar. Eisini verður mælt til at játta kr. 896.250 til rakstur og kr. 400.000 til húsaútreiðslur, útgerð og tilfar til frítíðartilboð fyri børnum í 3. flokki. Peningurin verður játtaður av kontu 3215 sparingar í sambandi við verkfallið.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Rúni Djurhuus taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Bogi Andreasen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til kunningar.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram eftirmeting til umrøðu.

**Mentamálanevndin 5. juni 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Við knøppu tíðini í huga og teim óvissum um, hvørt kommunan klárar at hava høli tøk til frítíðarskúla til 3. flokk í allari kommununi, eins og at arbeitt verður við endurskoðan av stovnsøkinum, verður mett skilabest fyribils at halda fram við verandi frítíðartilboðið til 3. flokk komandi skúlaár.

Tó verður mett, at ein arbeiðsbólkur umboðandi stovnar, foreldur og umsiting eigur at verða settur beinanvegin at viðgera møguliga alternativa skipan enn størri frítíðarskúli, t.d. klubbatilboð til nakrar skúlaárgangir í allari kommununi, t.d. 3.-5 flokk, og at hetta verður latið mentamálanevndini í seinasta lagi 1. november 2013.

Higartil hevur einki foreldragjald verið galdandi fyri tilboðið til 3. flokk, undantikið eitt tilmeldingargjald á 400 kr. við skúlaársbyrjan. Á Velbastað og í Nólsoy hevur frítíðarskúlin havt vanligt frítíðarskúlatilboð til 3. flokk samsvarandi samanleggingaravtaluni, tá kommunurnar løgdu saman, við somu starvsfólkanormering og sama gjaldi sum frítíðarskúli fyri 1.-2. flokk. Klagað er um henda mun í gjaldinum. Margarinfabrikkin hevur eisini havt børn úr 3. flokki, tó er onnur skipan galdandi, har hesi rinda 400 kr. um árið sum limagjald.

Til tess at fáa greiðari mynd av tørvinum og veruliga brúkinum, er fyrimunur at hava eitt foreldragjald á sama hátt sum á stovnsøkinum annars. Við støði í normeringini kundi gjaldið verið umleið 400 kr. um mánaðin. Tað krevur, at øll børnini við skúlaársbyrjan velja og verða skrásett til ávísan frítíðarskúla. Ikki allir frítíðarskúlar koma at hava tilboð til 3. flokk vegna plásstrot. Við hesum ber heldur ikki til at ganga á fleiri frítíðarskúlum í senn, so sum uppleggið til skipanina annars var.

Støða skal takast til, um slíkt mánaðarligt foreldragjald til hetta tilboð skal hava somu rættindi til fíggjarligt frípláss og systkinaavsláttur sum vanligi frítíðarskúlin. Verður tilboðið til 3. flokk mett sum ansingartilboð, so má metast, at foreldur hava rætt til bæði fíggjarligt frípláss sambært dagstovnalógini § 6 og systkinaavsláttur sambært upptøkureglunum § 12. Á sama hátt verða reglurnar um 2 mánaðar freist at siga upp plássið galdandi.

Verður tilboðið mett sum virkistilboð á sama hátt sum Margarinfabrikkin, kann støðan í útgangsstøðinum metast vera ein onnur. Virkistilboð í frítíðarskúlunum kann skipast við mánaðarligum foreldragjaldi, men uttan rætt til fíggjarligt frípláss, systkinaavsláttur og uttan skyldu um 2 mánðarar uppsagnartíð við gjaldi. Tað er tá meira upp til, hvat tænastustøði býráðið ynskir at veita í mun til gjøld. Gerast skal vart við, at frítt er at velja frá tilboðið til 3. flokk í frítíðarskúlunum og heldur brúka tilboðið hjá Margarinfabrikkini. Harumframt er spurningur, um tilboðið til 3. flokk á Velbastað og í Nólsoy skal skipast á sama hátt sum í frítíðarskúlum í kommununi annars, ella um haldast skal fast við skipanina, sum avtalað er í samanleggingini millum kommunurnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at verandi frítíðartilboð til 3. flokk heldur fram komandi skúlaár, og at settur verður arbeiðsbólkur at gera uppskot til klubbatilboð sum alternativa skipan. Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla harumframt til at áseta foreldragjald uml. 400 kr. um mánaðin til virkistilboð ætlað næmingum í 3. flokki á frítíðarskúlum.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at halda fram við verandi tilboð til 3. flokk restina av álmanakkaárinum uttan foreldragjald, at børnini verða skrivað til ávísan frítiðarskúla, at settur verður arbeiðsbólkur at gera uppskot til frítíðartilboð til børn í aldursbólkinum 3. flokk og eldri og at hetta arbeiðið verður samskipað við endurskoðanina av stovnsøkinum sum heild.

- Upplegg um frítíðartilboð til børn 3. flokk og eldri verður lagt fram.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Umrøtt og avgjørt at skipa ein temadag um frítíðarskúlaøkið í Tórshavnar kommunu 5. mars 2014, kl. 12.00.

**Ískoyti:**
Notat verður lagt fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at útvega neyðuga játtan til framhald av verandi frítíðartilboði til 3. flokk skúlaárið 2014/15, og at arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til frítíðar- og virkishús í býarpørtum eftir leisti líknandi sum Margarinfabrikkin at seta í verk í 2015.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til fígging av frítíðartilboðnum til 3. flokk fíggjarárið 2014. Harumframt samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til at skipa verkætlanartilgongd í sambandi við arbeiðið at gera uppskot til heildarætlan um frítíðar- og virkishús til børn og ung at seta í verk august 2015.

**Ískoyti:**
Á kontu 3215 aðrar útreiðslur barnaansing eru játtaðar kr. 1.150.000 til frítíðartilboðið ætlað 3. flokki í 2014. Skúlaárið 2013/14 eru 84 børn innskrivaði, við støði í eindarkostnaðinum kr. 16.092 er samlaði rakstrarkostnaðurin fyri árið kr. 1.351.728.

Fíggjartørvur er sostatt kr. 201.728.

Møguleiki er at fíggja hetta við foreldragjaldi. Sum skipanin er nú, er bert eitt árlig foreldragjald kr. 400. Um foreldragjald var ásett 25% av rakstrarkostnaðinum (ca. 16.000 pr barn árliga, tvs. foreldragjald uml. 400 kr. um mðr. í 10 mðr), fáast uml. kr 350.000 til vega fyri tey børn, sum hava hoyrt til frítíðarskúlarnar, men ikki Margarinfabrikkina. Hetta reisir spurningin, skulu børnini í triðja flokki, sum halda til í Margarinfabrikkini, eisini gjalda foreldragjald.

Fyrimunur við foreldragjaldi er fastari skipan/stýring, skráseting í ChildCare-skipanini sum øll hini børnini. Hetta gevur eisini neyvari mynd av, hvør nýtslan ella tørvurin reelt er og harvið útreiðslustøðið. Eitt so lágt foreldragjald hevur tó avleiðingar fyri systkinaavsláttraskipanina. Møguleiki er at áseta, at foreldragjaldið er ikki fevnt av rættindum um systkinaavsláttur og fíggjarlig frípláss.

Møguleiki er eisini at fíggja upphæddina innanfyri karmarnar á grein 3 kontu 3213 systkinaavsláttur minninýtsla frá 2013.

**Inklusión, børn við serligum tørvi:**
Kommunan hevur fingið fleiri fyrispurningar og áheitanir frá fólki við børnum, sum

hava serligar avbjóðingar, tí higartil hevur játtanin til serligan tørv ikki fevnt um hetta tilboðið vísandi til, at talan er ikki um frítíðarskúla sambært dagstovnalógini.

Uppá fyrispurning frá kommununi um henda praksis svarar løgfrøðiligi ráðgevin hjá Kommunufelagnum, at kommunan hevur neyvan eina desideraða skyldu til at veita brekaðum somu tænastu, sum kommunan hevur eftir § 5 í dagstovnalógini. Hinvegin er talan um eitt tilboð, sum hevur líkheit við tilboð eftir dagstovnalógini. Haraftrat er praksis hjá kommuni eitt sindur øvugt av ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sum eisini er galdandi fyri Føroyar. Hóast hesin sáttmáli ikki ásetir ítøkiligu rættarstøðuna beinleiðis – har má man bíða eftir lóggávu – so er tað partur av góðum fyrisitingarskikki at royna at halda seg til andan í hesum sáttmála, og har sær tað ikki so gott út, at frítíðartilboðini hjá kommununi ikki fevnir um tey, sum bera brek. Inkludering og sektorábyrgd (tvs. tey brekaðu eiga at fáa tilboðið frá tí myndugleika, sum veitir tænastuna) eru sentral í hesum høpi, sigur hann.

Hann reisir eisini spurningin um, hvørjar hjálpartænastur, ið Almannaverkið longu nú veitir hesum barninum í 3. flokki. Um tað longu hevur stuðul, hví kann stuðulin so ikki fylgja við til viðkomandi fríðtíðartilboð hjá kommununi heldur enn, at kommunan skal seta tað sama uppá beinini fyri nógvar pengar?

Samanumtikið sær hann ikki nakra formliga lógarskyldu, men kortini eina røð av argumentum, ið hava meira og minni løgfrøðiligan relevans, sum tala fyri, at eisini børn við breki eiga at inkluderast.

**Fleiri frítíðarskúlar:**
Klagur eru eisini frá foreldrum um, at tann frítíðarskúli, har teirra barn gongur í frítíðarskúla í 2. flokki, ikki hevur tilboðið til 3. flokk. Hetta skyldast plásstrot. Skulu fleiri høli fáast til vega, verður hetta at kosta meira í leiguútreiðslum, sum hædd er ikki tikið fyri í kostnaðarmetingini omanfyri. Tó er tikið við leigukostnaðurin av Immanuel.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at áseta eitt foreldragjald 25% av rakstrarkostnaðinum, alternativt til hetta at játta kr. 210.000 av kontu 3213 systkinaavsláttur. Harumframt verður mælt til prinsippiella støðutakan til inklusiónsspurningin.

**Mentamálanevndin 15. mai 2014:** Samtykt at áseta foreldragjald 25% av rakstrarkostnaðinum til frítíðartilboðið til 3. flokk bæði í frítíðarskúlum og Margarinfabrikkini. Harumframt samtykt at heita á umsitingina um beinanvegin at taka upp samráðingar við landsmyndugleikarnar um skipan við stuðlum hjá børnum við serligum tørvi í sambandi við frítíðartilboðið eitt nú við atliti at, at peningurin fylgir barninum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 06. juni 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein samtykkja, at verandi frítíðarskúlatilboð heldur fram fíggjarárið 2014 út við foreldragjaldið áljóðandi 25% av rakstrarkostnaðinum og at leggja málið fyri býráðið.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við mentamálanevndini vísandi til, at talan er ikki um eitt skipað tilboð fyri alla kommununa, og kommunan ikki hevur tikið støðu til, um 3. flokkur yvirhøvur skal umfatast av frítíðarskúlatilboði.

**Býráðsfundir 16. juni 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt. Trivnaðarstjórin sendir nevndini uppskot til loysn.

**Ískoyti:**
Áheitanin frá mentamálanevndini á trivnaðarstjóran um uppskot til loysn verður fatað sum prinsippiel støðutakan til, at børn við serligum tørvi, sum taka lut í frítíðartilboðnum til 3. flokk, skulu hava í minsta lagi somu treytir til stuðul og ráðgeving, sum tey, ið ganga í vanligum frítíðarskúla. Uppskotið til loysn er tí við støði í hesum.

Kommunan hevur tvær høvuðsfyriskipanir til børn við serligum tørvi. Onnur fyriskipanin er, stovnar kunnu søkja um námsfrøðiliga ráðgeving frá ráðgevaratoyminum hjá barna- og ungdómsdeildini til eitt ávíst barn í samráð við foreldrini. Hin fyriskipanin er, at tá eitt barn hevur tørv á ávísum námsfrøðiligum tiltaki, sum krevur fleiri resursir enn tær, sum vanliga eru á stovninum, kann stovnurin í serligum førum søkja um eyka tímar  (fígging til øktan starvsfólkatørv).

Í fíggjarætlanini er námsfrøðiliga ráðgevingin fíggjað á kontu 3211, meðan tímarnir til stovnarnar verða játtaðir av kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv. Umsitingin metir, at umleið 10-12 børn við serligum tørvi væntast at taka av frítíðartilboðnum til 3. flokk næsta skúlaár. Fyri tíðarskeiðið august-desember 2014 verður hetta mett at kosta uml kr. 300.000 kr.

Mett verður, at økt virksemi í mun til 3. flokk fær ikki stórvegis avleiðingar fyri fíggjarstøðuna á kontu 3211 Námsfrøðiliga ráðgevingin, men fíggjarstøðan á kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv loyvir ikki at økja um virksemið til 3. flokk eisini.

Nýtslan á kontu 3212 hevur síðstu árini verið vaksandi, uttan at játtanin hevur fylgt við tørvinum í sama mun. Úrslitið er ein framflutt meirnýtsla frá 2013 uppá kr. 552.000, og framroknað meirnýtsla fyri 2014 er kr. 775.00, sum hædd má takast fyri í fíggjarætlanin 2015.

Til tess at tálma vøksturin hevur umsitingin gjørt av at eftirhyggja fyriskiparnirnar bæði í mun til treytir um tørv, áðrenn tímar verða játtaðir, og um tímarnir kunnu gagnnýtast betri. Hetta væntast liðugt í heyst sum íkast til fíggjarætlanarviðgerðina.

Í mun til børnini í 3. flokki, so ber til at játta eykafígging til hetta økta virksemið august-desember 2014, og at hædd annars verður tikin fyri hesum í fíggjarætlanini 2015.

Vísandi til, at eingin nýtsla higartil hevur verið á kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing, verður mett møguligt at játta kr. 300.000 av hesi kontu til økta virksemið í sambandi við frítíðartilboðið til 3. flokk fyri tíðarskeiðið august-desember 2014.

Trivnaðarnevndin og mentamálanevndin vara av hesi kontu, eins og hesar báðar nevndr vara av kontu 3211 Námsfrøðiliga ráðgeving og kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv. Skal eykafígging játtast av kontu 3210 og skulu fyriskipanirnar til børn við serligum tørvi víðkast til

frítíðartilboðið til 3. flokk eisini, eiga báðar nevndir at samtykkja tað, áðrenn tað fer í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til,

- at fyriskiparnirnar námsfrøðilig ráðgeving og tímar vegna serligan tørv eisini fevna um børn við serligum tørvi í frítíðartilboðnum til 3. flokk,
- at tað í hesum sambandi verða játtaðar kr. 300.000 av kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing til kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv fyri tíðarskeiðið august-desember 2014, og
- at hædd verður tikin fyri hesum í fíggjarætlanini 2015.

Ein meiriluti í trivnaðarnevndini: Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen tóku um teldupost undir við tilmælinum og formliga góðkenna á fyrst komandi fundi í trivnaðarnevndini. Marin Katrina Frýdal og Annfinn Brekkstein hava ikki svarað.

Ein meiriluti í mentamálanevndini: Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Tróndur Sigurðsson tóku um teldupost undir við tilmælinum og formliga góðkenna á fyrst komandi fundi í mentamálanevndini. Bogi Andreasen og Jógvan Arge hava ikki svarað.

**Mentamálanevndin 03. juli 2014:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen og Elin Lindenskov, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 03. juli 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at tilboðið er galdandi fíggjarárið 2014 og at beina málið í býráðið.

Harumframt víst til samtykt í mentamalanevndini 15. mai 2014 um samráðingar við landsmyndugleikarnar.

**Býráðsfundir 03. juli 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í mentamálanevndini 7. mai 2014 um heildarætlan fyri frítíðar- og virkishús til børn og ung verða lagdar fram metingar um rakstrarkostnað.

**Mentamálanevndin 3. september 2014:** Umrøtt. Nevndin heitir á fyrisitingingina um at kanna hvussu býráðssamtyktin 3. juli 2014 verður útint.

**Ískoyti:**
Frítíðartilboðið til 3. flokk í skúlanum á Argjahamri hevur í ár hildið til í lærarastovuni. Skúlin ynskir ikki hesa loysn at halda fram. Pláss er ikki í frítíðarskúlanum, nú forskúli eisini er aftrat 1.-2. flokki.

Frítíðarskúlin hevur víst á fyribil loysn til næsta skúlaár í skúlanum. Komandi 3. flokkur hevur bert 25 næmingar og brúkar eitt flokshøli. Stovan hinumegin flokshølinum hjá flokkinum er

tómt. Einasta stig, ið skulu gerast, er at gera hølini klár, m.a. at skifta okkurt skúlainnbúgv út við frítíðarinnbúgv.

Skúlin er ikki sinnaður til hesa loysn, og vísir á, at skúlin er góðkendur sum 2-sporaður skúli. Til ber ikki at taka eina floksstovu burturúr, tí undirvísingin krevur fleiri møguleikar fyri arbeiðsplássi, og ein flokkur-ein stova er ikki longu galdandi, men at fleiri møguleikar skulu verða í boði til hvønn flokkin. Eisini verður víst á, at fyrispurningur er um at fáa næming inn í 3. flokk. Skúlin ynskir ikki enn eina "hovsaloysn", tí tað hevur havt ómetaliga keðiligar avleiðingar fyri starvsfólkasamstarvið á stovnunum báðum. Eisini vísir skúlin á, at møguligar bygnaðarbroytingar í skúlanum skulu viðgerast í skúlastýrinum.

Mett verður ikki, at talan er um formella bygnaðarbroyting, men um annað brúk av skúlans hølum í eitt styttri tíðarskeið.

Um tilboðið til 3. flokk ikki skal vera í skúlanum á Argjahamri, so eru alternativini hesi:

- At kommunan leigar AB-húsið til 3. flokk undir leiðslu av frítíðarskúlaleiðaranum á Argjahamri. Fyrimunur er, at hetta er á Argjum. Vansi er, at frítíðarskúlin skal deila hølini við AB, og at fígging skal til keyp av útbúnaði og klárgering. Flokkurin er bert 25 næmingar, og normeringin ber ikki tvey starvsfólk, so neyðugt er við meirnormering. Um ikki øll melda til, men bert t.d. 15, so krevst ein eykafígging til normering uppá uml. kr. 175.000, og fíggjarliga er hetta viðkvæmt í mun til sjúkrameldingar og harvið fíggjartørv til vikar. Møguliga er neyðugt við skipaðum flutningi, tað er uml. 1,5 km at ganga niðan, har opið er fyri vindi og veðri. Kostnaðurin av hesum ógreiður.

- At 3. flokkur fer í Spíran í Havnardali. Fyrimunur er, at hetta er í regi av frítíðarskúlanum í Hornabø og ávirkar ikki eyka normeringstørv til starvsfólk annað enn barnatalið. Fyrimunur er eisini, at alt er klárt. Vansi er, at neyðugt er við skipaðum flutningi av Argjahamri til Spíran í Havnardali. Við støði í kostnaðinum til flutning Hornabø-Spírin, skal roknast við fíggjartørvi til flutning uppá uml. kr. 100.000.

- At 3. flokkur fer í Margarinfabrikkina. Fyrimunur er, at tað krevur ikki nakað eyka til klárgering ella eyka starvsfólkanomering annað enn barnatalið. Vansi er, at Margarinfabrikkin er ikki frítíðarskúli, og 3. flokkur á Argjahamri verður tí einasti flokkur, sum hevur frítíðaritlboð uttan fyri regi av frítíðarskúlunum. Hinvegin er Margarinfabrikkin pedagogiskur stovnur. Fyrimunur er eisini, at bussleiðin koyrir av Argjahamri til miðbýin ókeypis.

Loysnin á Argjahamri og í Margarinfabrikkini hevur ikki tørv á meirfígging. Loysnin á Argjahamri er mest uppløgd fyri næmingarnar og fíggingina, eisini normeringar, men skúlin ynskir ikki hesa loysn í mun til skúlavirksemið. Loysnin í Spíranum kostar í flutningi. Loysnin í AB-húsinum krevur eyka normering.

Síðani frítíðartilboðið til 3. flokk varð skipað, hava á hvørjum ári verið trupulleikar við hølisviðurskiftum. Setast eigur í kortið ein varandi loysn hesum viðvíkjandi, áðrenn skúlaárið 2016/2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla í fyrsta lagi til loysn á Argjahamri, í øðrum lagi til loysn í Spíranum í Havnardali treytað av játtan til bussflutning.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um hølisloysn á Argjahamri.

**Ískoyti:**
Barna- og ungdómsdeildin hevur saman við avvarðandi frítíðarskúlaleiðarum tikið saman um royndirnar við frítíðartilboðnum til 3. flokk og mett um, hvussu tilboðið skal skipast framyvir, harundir tørvin á varandi hølisloysnum. Sí skjal: «Eftirmeting av verandi frítíðartilboðum til 3. flokk og boð uppá varandi hølisloysnir.»

Boð uppá varandi loysnir eru:

- Byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út eisini til ungdómstilboð
- Flyta ella skipa Spíran á øðrum náttúrustað
- Byggja frítíðarskúlan í Badmintonhøllini út til 3. flokk
- At flyta tilboðið í Hoyvík inn í frítíðarskúlan í Hoyvík
- Margarinfabrikkin hevur framhaldandi tilboð eisini til 3. flokk
-

Til komandi skúlaár verður lagt upp til hesar hølisloysnir:

- Tilboðið heldur fram í skúlanum á Argjahamri, men nýggj hølisloysn má finnast
- Tilboðið í Spíranum heldur fram
- Tilboðið í KFUM heldur fram, møguliga knýtt at leiðsluni í Badmintonhøllini
- Tilboðið í Hoyvík verður flutt inn í frítíðarskúlan í Hoyvík
- Margarinfabrikkin hevur framhaldandi tilboð eisini til 3. flokk

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til umrøðu av eftirmetingini og støðutakan til a) uppskot til varandi hølisloysnir og b) hølisloysnir til komandi skúlaár.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við omanfyri standandi loysnum fyri næsta skúlaár. Harumframt verður mælt til at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við útbyggingini av fimleikahøllini, og at kanna møguleikan fyri at byggja Badmintonhøllina út til frítíðarskúlaendamál og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt um at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við útbyggingini av fimleikahøllini.

Í sambandi við, at fimleikarhøllin verður bygd út til ítróttahøll, er møguleiki at byggja frítíðarskúlan út samstundis. Sum bygningspartar eru teir sambygdir.

Verkætlanin við at byggja ítróttahøllina er samtykt, og síðsta hond verður lagt á prosjektering v.m. Skal útbyggingin av frítíðarskúlanum knýtast uppí uttan at órógva byggingina av

ítróttahøllini, skal avgerð takast um tað beinanvegin, eins og tað at koma afturumaftur seinni verður munandi dýrari.

Í mun til barnatalið, ið er á stovninum nú, er hann ov lítil. Frítíðarskúlin er bygdur til tveir árgangir. Við forskúla og triðja flokki eru reelt fýra árgangir knýttir at frítíðarskúlanum. Umframt at loysa upp fyri hesum, kann útbyggingin tryggja høli til ungdómsklubb-tilboð á Argjum eftir sama leisti sum í t.d. Hoyvík.

Talan er um møguleika at byggja 130 m2 aftrat. Kostnaður at inniloka endan (rábygning uttan vindeygu v.m.) er mett til uml. kr. 150.000. Innrætting, tekniskar installatiónir og klárgering vm. verður mett at kosta kr. 1,6 mió.

Í mun til at fáa tryggjað, at útbyggingin av rábygninginum kann fremjast saman við ítróttahøllini, skulu kr. 150.000 játtast til endamálið. Hetta kann fíggjast við at flyta part av minninýtslu hjá frítíðarskúlanum á Argjahamri konta 3142 til íløguverkætlanina. Støðutakan til fígging av innrætting v.m. kann takast uppaftur seinni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og mentamálaleiðarin mæla til at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við byggingini av ítróttahøllini. Til tess í fyrsta umfari at fáa bygt rábygningin verður mælt til at játta kr. 150.000 av kontu 3142 frítíðarskúlin á Argjahamri til íløgukontu 5775 L57025 útbygging av høllini í skúlan á Argjahamri.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið sum eykajáttan at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið til fundin í mentamálanevndini 6. apríl 2016 um, at tilboðið í KFUM heldur fram, møguliga knýtt at leiðsluni í Badmintonhøllini. Harumframt verður víst til samtykt mentamálanevndarinnar um at kanna møguleikan fyri at byggja Badmintonhøllina út til frítíðarskúlaendamál.

Kommunan hevur leigumál um hølini í KFUM, sum í hesum høpi er sjálvsognarstovnur. Leiðarin hevur boðað nevndini fyri sjálvsognarstovnin KFUM frá uppsøgn hennara. Sum rakstrareind ber tilboðið seg ikki við teirri normering og fígging, sum sett er til frítíðartilboðið. Grundarlag fyri framhaldandi leigumálið í KFUM til hetta tilboðið er tí sera ivasamt.

Mett verður, at til ber at flyta hetta virksemið niðan í Gundadal undir leiðslu av frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini. Hetta kann gerast eitt nú við at Bridgehúsið til 3. flokk, so sum gjørt er áður, ella at seta upp fyribils høli við Badmintonhøllina, ið uppá sikt eisini kann útbyggjast.

Kommunan eigur fyribilshøli við sjónleikarahúsið, hetta kundi verið skjót loysn. Í sambandi við byggingina av Skúlanum á Fløtum hevur tó verið hugsað, at hesi kunnu brúkast til byggileiðslu v.m. har.

Tilboðið í Gundadali/Badmintonhøllini hevði í fyrsta umfari verið ætlað næmingunum í 3. flokki í Sankta Frans skúla evt. eisini Eysturskúlanum, sum tó higartil hava brúkt Margarinfabrikkina í størri mun.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at siga upp leigumáilð við KFUM og at taka støðu til hølisloysn í Gundadali.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Staðseting av 3. flokstilboð skúlaár 2017/18

Argjahamar:
Vísandi til Mentamálanevndar-fund 6. apríl 2016, mælti trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og mentamálaleiðarin at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við byggingini av ítróttahøllini. Í fyrsta umfari bleiv tað játtað at nýta 150.000 kr. av rakstrarkotuni 3142 hjá frítíðarskúlanum á Argjahamri til íløgukontu 5775 L57025 útbygging av høllini í skúlan á Argjahamri, hetta til at byggja rábygningin til frítíðarskúlan á Argjahamri. Kostnðarmeting fyri at gera úbyggingina av frítíðarskúlanum lidna er uppá kr. 1,8 mió.

Sum er, er 3. floks tilboðið á Argjahamri staðsett í fyribilshølum í grunddeildini, hetta í meðan bíðað verður eftir útbyggingini. Við tað, at hetta fyribilshøli er etablerað í einum fríum øki í grunddeildini, órógvar hetta undirvísingina oa.

Skúlin á Fløtum/Havnardalur:
Frítíðartilboðið til tveir flokkar av børnum úr skúlanum á Fløtum er staðsett í felagshølunum hjá Føroya Ríðingarfelag í Havnardali. Kommunan hevur leigað hølini í mong ár. Felagið hevur alt sítt dagliga virksemi á økinum, har frítíðartilboðið hjá børninum er. Húsið hjá ríðingarfelagnum er als ikki hóskandi til tilboðið, og virksemið hjá báðum pørtum hóskar ikki væl saman. Ynski er at koma úr hesum leigumáli, og at børnini í 3. flokki í Skúlanum á Fløtum í staðin fáa í boði tilboð í Margarinfabrikkini. Tilboðið til 2. flokk heldur fram í Spíranum í Havnardali.

Staðsetingar:
Til komandi skúlaár verður lagt upp til hesar staðsetingarnar av 3. floks frítíðartilboðnum:

- Tilboðið heldur fram í skúlanum á Argjahamri, men mælt verður til, at løgujáttan kr. 1,8 mió verður fingin til vega at gera útbyggingina av frítíðarskúlanum lidna eisini ætlað nýggjum ungdómstilboði.
- Tey børnini úr skúlanum á Fløtum, sum eru í Miðstovninum, halda áfram í frítíðartilboðnum í Miðstovninum.
- Tey børnini úr skúlanum á Fløtum, sum nú eru í Havnadali, fáa Magarinfabrikkina í boði.
- Børnini í Eysturskúlanum fáa Magarinfabrikkina í boði.

- Børn í Sankta Frants skúla, undir leiðslu í frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini, í leigaðum hølum í B36 húsinum eins og nú
- Børn í Hoyvíkar skúla halda fram í frítíðartilboðinum í Frítíðarskúlanum í Hoyvík
- Frítíðartilboð til børn í skúlanum við Løgmannabreyt verður staðsett bæði í frítíðarskúlanum og skúlanum, so sum skúlaleiðslurnar hava víst á, og at hetta verður treytað av, at samstarvið er ikki tengt at sveiggjum í næmingatalinum í yngstu flokkunum.
- Margarinfabrikkin hevur annars framhaldandi tilboð til øll børn í 3. flokki, sum ynskja hetta.
- Nólsoy, Velbastað, Kaldbak og Kollafjørður hava á verandi støðum

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjóri og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at taka undir við omanfyri standandi staðsetingum, harundir at siga upp sáttmálan um leigu av felagshúsinum hjá Føroya Ríðingarfelag og at fáa til kr. 1,8 mió til at gera útbyggingina av frítíðarskúlanum á Argjahamri lidna.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um staðsetingar og uppsøg av leigusáttmla við Føroya Ríðingarfelag, og at taka málið um játtan til at gera útbyggingina av Argjamhamri upp seinni.

Jákup Dam og Helena Dam á Neystabø vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Miðstovnurin í Gundadali, ið hevur hýst 3. floks tilboði, er niðurlagdur, og tískil ber ikki til at bjóða 3. flokstilboð har eftir summarfrítíðina 2018.

Harumframt hevur B36 sagt avtalu um høli upp, og tískil hevur Frítíðarskúlin í Badmintonhøllini ikki umstøður at hýsa 3. flokki eftir summarfrítíðina 2018.

Møguleiki er fyri, at hesi børn fáa 3. flokstilboð í Margarinfabrikkini um Margarinfabrikkin kann disponera yvir einum høli uppiá til eina verkstovu t.d. til smíð. Hetta høli hevur verið brúkt sum venjingarhøli til tónleikabólk.

Eftir hesum fáa triðju flokkarnir í Skúlanum á Fløtum, Eysturskúlanum og Sankta Frans skúla frítíðartilboð í boði. Kostnaðurin fyri 3. floks tilboðið í Margarinfabrikkini er skipaður øðrvísi enn tey tilboðini, sum eru úti í skúlunum. Kostnaður er kr. 800 árliga umframt gjald fyri mat kr. 5-7 og teldu kr. 10 um dagin, meðan gjaldið til hini 3. flokstilboðini er kr. 451 pr. mðr. í 10 mðr um árið.

Í frítíðarskúlanum í Hoyvík er avbjóðandi at bjóða 3. flokstilboð komandi skúlaár, tí einans 20 børn eru í núverandi 2. flokki. Sambært núverandi útrokningargrundarlagi, so gevur hvørt barn 1,315 starvsfólkatíma, tvs. at 19 børn skulu verða tilmeldað fyri at dekka útreiðslurnar til

starvsfólkatímar. Haraftrat skulu leggjast rakstrarútreiðslur, tvs. innihaldið í tilboðnum, t.d. svimja, hallarnýtslu, at bjóða børnunum millummála osv.

Henda avbjóðing kann loysast við at játta í minsta lagi 40 starvsfólkatímar til frítíðartilboðið fyri 3. flokk í frítíðarskúlanum Hoyvík skúlaárið 2018/19. Skúlaárið 2019/20 er væntandi ikki sama avbjóðing, tí núverandi 1. flokkur er yvir 40 næmingarar.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til, at 3. flokkur, ið áður hava hildið til í Miðstovninum í Gundadali og Frítíðarskúlanum í Badmintonhøllini, fáa bjóðað tilboð í Margarinfabrikkini eftir summarfrítíðina 2018 eftir vanligu gjaldsskipanini í Margarinfabrikkini.

Eisini verður mælt til at játta 40 starvsfólkatímar til 3. floks tilboðið í frítíðarskúlanum í Hoyvík skúlaárið 2018/19.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Framtíðin hjá frítíðartilboðnum til 3. flokk

Tórshavnar kommuna bjóðar frítíðartilboð eftir skúlatíð til børn í 3. flokki fyrstu ferð í august 2012 sum eina royndarskipan. Tórshavnar Býráð avgjørdi eftir verkfallið hjá Pedagogfelagnum í 2012 at peningurin kommunan hevði eftir verkfallið skuldi brúkast til at stovna eitt klubb tilboð til børn í 3. flokki eftir skúlatíð.

Frítíðartilboðið verður lýst soleiðis á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu 12-09-2012:

*"Eitt frítíðartilboð hevur nøkulunda tað sama at bjóða sum ein frítíðarskúli, við verkstøðum, ítrótti og spæli yvirhøvur.*

*Børnini, ið taka av hesum tilboði, ganga frá skúla sjálvi, og opið er til kl. 17.00. Frítíðartilboðini eru á hesum stovnum:*

*Barna- og Ungdómshúsinum Látrinum í Nólsoy, Dagstovninum Flatnagarði í Kaldbak, Frítíðarskúlanum á Argjahamri, Frítíðarskúlanum í Hoyvík, Dagstovninum við Botnánna, Margarinfabrikkini og Spíranum í Havnardali.*

*Barninum stendur frítt í boði at velja stovn og kunnu tey skipast eftir áhuga. Tilboðið er ókeypis, tó kunnu børnini tekna seg sum lim fyri 400 kr. um árið og fáa ymsar ágóðar, ið fylgja við limaskapinum.*

*Innlimingarskjal er at finna á heimasíðuni hjá kommununi www.torshavn.fo/Default.aspx?pageid=1116 og skal tað latast stovninum ella sendast sum teldupostur. Vónandi verður hetta eitt áhugavert og gott tilboð, sum børn og foreldur fara at taka væl ímóti."*

**Foreldragjald**

06. juni 2014 samtykkir fíggjarnevndin, at frítíðarskúlatilboðið til 3. flokk heldur fram við foreldragjaldið áljóðandi 25% av rakstrarkostnaðinum.

**Mentamálanevndin**
Málið um frítíðartilboð til 3. flokk hevur javnan verið lagt fyri Mentamálanevndina (áleið 14 ferðir) síðani 2012, har afturvendandi verður víst á avbjóðingarnar við tilboðnum, so sum:

- afturvendandi hølisavbjóðingar,
- børn við serligum tørvi eiga sbrt. ST- sáttmálanum at inkluderast, hóast tað ikki er skylda hjá kommunum sbrt. dagstovnalógini § 5
- foreldur eru ónøgd við, at frítíðarskúlin barnið hevur gingið á ikki hevur tilboðið til 3. flokk
- normeringin er so lág, at tað ber ikki til at veita eitt tilboð til 3. flokk, ið liggur uttanfyri frítíðarskúlan til forskúla, 1. og 2. flokk. Dømi er um hetta, tá 3. flokkur varð staðsettur í Immanuel í Hoyvík.
- Samstarvsavbjóðingar millum skúlaleiðslu og dagstovnaleiðslu, tá 3. flokstilboðið er staðsett inn í einum skúla

**Støðan í dag**
Frítíðartilboðið til 3. flokk er í dag staðsett í:

- Margarinfabrikkini
- Frítíðarskúlanum í Hoyvík
- Frítíðarskúlanum á Argjahamri
- Frítíðarskúlanum við Løgmannabreyt
- Barna- og Ungdómshúsinum Látrinum í Nólsoy,
- Dagstovninum Flatnagarði í Kaldbak,
- Dagstovinum við Botnánna í Kollafirði
- Dagstovninum á Velbastað

Tilboðið flutti vegna plásstrot úr Spíranum í 2016, Smílibýlinum í 2017, og úr Badmintonhøllini 2018 oman í Margarinfabrikkina.

**Upp- og afturlatingartíðir**
Tilboðið letur upp, tá vanliga tímatalvan hjá 3. flokki er liðug og er stongt í ferium og einstøkum døgum, tá skúlin er stongdur

**Margarinfabrikkin**
Sbrt. leiðaranum á Margarinfabrikkini, so gongur væl at hava 3. floks tilboðið í Margarinfabrikkini, tí virksemið fekk atgongd til hølið á ovastu hædd til 5. og 6. fl. Eldru flokkarnar ynskja ikki at vera saman við 3. fl., tí aldursmunur er og tí riggar væl, at 5. og 6. brúkar hølini á ovastu hædd.

114 børn eru tilmeldaði 3. flokkstilboðið í Margarinfabrikkini og samlaði limatalið í Margarinfabrikkini hevur ongantíð verið so høgt sum nú – í alt eru 195 limir. Vanligar dagar koma 60/70 børn frá 3. fl. í Margarinfabrikkini, tí summi ganga til annað frítíðarvirksemi/ítrótt og tí koma tey ikki hvønn gerandisdag.

Leiðarin metir, at tilboðið saktans kann halda fram, treytað av rúmini uppiá, ið verða tøk við ársenda kunnu brúkast til virksemi. Børn við serligum tørvi koma eisini í 3. flokstilboðið og summi hava tungar diagnosur. Hesi børn hava tørv á at kunna trekkja seg í friðarlig rúm við t.d. pútum og øðrum.

Margarinfabrikkin hevur gjørt sær tær royndir, at neyðugt er, at tilboðini bjóða ymisk virksemi, ið eru støðug, og ikki verða avlýst t.d. um sjúka er, men avloysari altíð verður sett inn fyri, tí annars tíma børnini ikki og virksemi dettur niður fyri.

**Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt**
3. flokstilboð lat upp við skúlan við Løgmannabreyt á sumri 2017 og hevur barnatalið verið sera støðugt á uml. 44 børn. Komandi skúlaár lækkar barnatalið til áleið 32, fyri síðani, at barnatalið hækkar upp í 44/48 børn. Millum 25-30 børn møta hvønn dag, tí børnini ganga til ymsan ítrótt og tí møta tey ikki hvønn dag.

3. flokstilboðið heldur til í einum loftsrúmi á 70m2. Tey royna at fáa sum frægast burturúr, men ynskiligt hevði verið at fingið meira pláss. Tó hevur 3. fl. atgongd til felagsrúm. Virksemið millum skúla og frítíðarskúla “klasja” og tí taka ósemjur seg upp stovnarnar millum. Tískil hevði leiðslan á 3. flokstilboðnum ynskt, at 3. fl. rúmaðist saman við hinum børnunum í frítíðarskúlanum.

**Frítíðarskúlin á Argjahamri**
3. flokstilboðið í Frítíðarskúlanum á Argjahamri hevur verið síðani 2012. Hetta skúlaárið tvs. 2018/19 møta 44 børn hvønn dag. Royndirnar vísa, at børnini nýta væl av, at vera í einum kendum umhvørvi. Sum er, er sera trongligt og sær leiðarin tí fram til, at útbyggingin verður liðug, soleiðis tað verður rúmsáttari fyri børnini frá forskúla upp til 3. flokk og starvsfólkunum. 3. flokkur húsast í dag í einum lítlum høli nevnt “sukurmolin”.

Frítíðarskúlin ynskir at varðveita skúlastovuna eftir, at útbyggingin er tikin í nýtslu.

Innihaldið í 3. floks tilboðnum er merkt av, at børnini hava myndað dagin sjálvi og skipað er fyri mánaðarligum barnaráðsfundum, har børnini eru komin til orðanna, at koma við hugskotum til hvussu og hvat innihaldið í degnum skal vera.

**Frítíðarskúlin í Hoyvík**
Í verandi løtu eru 82 børn tilmeldaði í frítíðarskúlan í Hoyvík og 20 børn tilmeldaði frítíðartilboðið fyri 3. flokk í Hoyvík. Í januar 2019 koma 1-2 børn afturat í frítíðarskúlan. Av hesum 82 børnunum eru 3 børn, sum eru knýtt at serstovuni í Hoyvíkar skúla, ið hava serligan tørv, ið eisini fáa frítíðarskúlatilboðið. Tað eru 13 námsfrøðingar og hjálparfólk í starvi, og afturat teimum eru køksfólk og reingerðarfólk.

**Avbjóðing skúlaár 2019/2020 í Hoyvíkar skúla og framyvir**
Um barnatalið kemur at líkjast núverandi, so kemur tað at síggja uml. soleiðis út komandi ár 2019/2020:

1. flokkur: 35 børn
2. flokkur: 36 børn
3. flokkur: 48 børn
Tilsamans: 119 børn

Børnini í 3. flokstilboðnum møta 100% upp og tískil er væntandi, at uppmøtingin verður tann sama komandi ár.

Í frítíðarskúlanum koma við hesum at verða uml. 71 børn tilmeldaði og er tað væl hóskandi í mun til hølisumstøðurnar á stovninum, og í mun til, um í minsta lagi játtaðu hallartíðirnar halda fram.

Við frítíðartilboðnum fyri 3. flokk verður ein stór avbjóðing, tí hølini, har tey eru nú, ikki eru egnaði til fleiri enn uml. 25 børn, har børnini eisini til ávísar tíðir í fastari skipan nýta hallirnar og avmarkaði hølir í frítíðarskúlanum saman við 1. og 2. flokki. Um ein loysn ikki fæst á hølisavbjóðingini til komandi ár, so hevur frítíðartilboðið fyri 3. fl. ikki møguleika at taka í móti øllum børnunum, og við støði í námsfrøðiligum sjónarhorni er hetta sera óheppið fyri barnabólkin og tað sosiala arbeiði, sum børnini tilognað sær, meðan tey eru í frítíðarskúla.

**Loysnir:**
Mentamáladeildin vísir á, at Grunddeildin er 1. – 3. árgangur. Í Hoyvíkar skúla eru flokkarnir í grunddeildini ikki í sama bygningi. 1. og 2. árgangur er í lítla bygninginum, og 3. árgangur er í høvuðsbygninginum. Frítíðarskúlin er í lítla bygninginum, og har eru allir tríggir árgangirnir saman.

Næmingatalið í grunddeildini skúlaárið 2018/2019 er 106, men næsta skúlaár verður næmingatalið 120. Skúlin og frítíðarskúlin hava sum kunnugt hvør sína leiðslu. Hølisnýtslan er felagsmál, og hølini eiga at verða brúkt optimalt, men sum støðan verður næsta skúlaár, verður ikki nóg rúmsátt í lítla bygninginum til 1. og 2. árgang og frítíðarskúla til 1., 2. og 3. árgang. Haraftrat er sertilboð til børn við autismu í Hoyvíkar skúla, og tey yngstu børnini í sertilboðnum ganga eisini í frítíðarskúla, so serstova er til tey í frítíðarskúlanum.

Starvsfólkini í 1. og 2. flokki í Hoyvíkar skúla brúka flokshølini eftir skúlatíð til fyrireiking, samstarvsfundir, foreldraviðtalur o.a. Hetta tí, at fundarhøli og fyrireikingarhøli ikki eru á staðnum.

Frítíðarskúlin er vælkomin at brúka skúlastovurnar, tá tær eru tøkar, men um tilboðið til 3. flokk skal halda fram á staðnum, er neyðugt, at stovurnar eru tøkar til frítíðarvirskemi hvønn dag eftir skúlatíð, og tað ber illa til undir verandi umstøðum.

Umsitingin er í ferð við at gera byggiskrá fyri høvuðsumvæling og dagføring av Hoyvíkar skúla og frítíðarskúla, og í tí sambandinum verður m.a. atlit tikið til, at pláss verður fyri frítíðartilboði til 3. árgang. Haraftrat er ætlanin, at umstøðurnar hjá starvsfólkunum verða góðar, m.a. við hølum til fyrireiking, bólka- og fundarhølum.

Barna- og ungdómsdeildin metir, at besta loysnin hevði verið, at frítíðarskúlin og 3. flokstilboð burturav brúkar hølini í líta bygninginum og at frítíðarskúlin og frítíðartilboðið fyri 3. flokk hevur fyrsta rætt at nýta skúlastovurnar í ovastu hædd í bygninginum aftan á skúlatíð hvønn dag. Hetta tí, at møguligt hevði verið at hildið fram at gagnnýtt tilboð og starvsfólk uppá tvørs av frítíðarskúla og 3. flokstilboð. Arbeitt hevur við hesi loysn saman við leiðslunum á staðnum, men Barna- og ungdómsdeildin og Mentamáladeildin mugu ásanna, at hetta hevur ikki borið á mál.

Ein onnur loysn kundi verið, at 3. flokstilboðið verður staðsett í lonunum í Hoydølum komandi skúlaár, sum Tórshavnar kommuna hevur leigusáttmála við Mentamálaráðið samstundis sum arbeitt verður við, at 3. flokstilboðið skal vera integreraður partur av umbyggingini av Hoyvíkar skúla.

Fyri at eitt 3. flokstilboð kann gerast veruleiki í lonunum í Hoydølum, so mugu tillagingar gerast bæði í mun til innbúgv og starvsfólkanormering. Sum sagt verða 48 børn, ið koma at nýta 3. flokstilboðið í lonunum í Hoydølum eftir summarfrítíðina. Tilboðið verður skipað á tann hátt, at børnini koma sjálvi til tilboðið í Hoydølum, tá skúlatíðin er liðug. Opið er til kl. 17.00 hvønn dag, tá ið skúlagongd er. Gerandisdagurin verður skipaður á tann hátt, at ymiskt virksemi verður bjóðað. Námsfrøðiliga endamálið er at skapa eitt námsfrøðiligt virksemi til børnini, við denti á:

- Dygdargóðan sosialan felagsskap, ið er skipaður av tilvitaðum yrkisfólki
- Dragandi frítíðarvirksemi skipað við støði í tørvi og ynskjum hjá børnunum av vegleiðandi starvsfólki

<u>Karmar:</u>
Hølini talan er um, eru í suður/eystur síðuni, og er talan um bæði rúmini í ovaru hæddini (torninum), somuleiðis sum bæði rúmini niðaru hæddini eisini skulu nýtast til frítíðartilboðið. Rúmini í ovari hæddini skal brúkast sum námsfrøðilig rúm, har sosialur felagsskapur er í hásæti. Tað eina rúmið verður eisini brúkt sum matarrúm. Tað eina rúmið í niðaru hæddini skal brúkast sum eitt námsfrøðiligt verkstað, har møguleiki er at menna teirra kreativu førleikar, meðan hitt rúmið skal brúkast sum klædnarúm.

Í løtuni eru eingi vesi viðurskiftir í hølunum, og hetta skal eisini gerast, áðrenn hølini kunnu takast í nýtslu. Ein loysn kundi verið, at ein vesivognur verður settur uttanfyri lonirnar. Vesir eru í niðaru hæddini, ið verða brúkt til báðar vøggustovurnar niðriundir, har skiftiborð o.a. er. Mett verður ikki, at størri børnini skulu brúka hesi vesir, tí hetta er órógvandi fyri smærri børnini og hetta kann gerast ov rokaligt fyri tey smæstu.

Hølini í Hoydølum eru tóm og tí er neyðugt við innbúgvi, tilfari og einum tekøki. Samanlagt gevur hetta eina eingangs kostnaðarmeting á **<u>kr. 219.000.</u>** Sí hjálagda yvirlit yvir innbúgv. Mett verður, at hetta kann fíggjast yvir rakstur á kontu 3216 ungdómsverkætlanir lutvíst av minninýtslu í fjør og lutvíst av játtanini í ár, sum er hækkað eitt vet.

<u>Normering o.a.:</u>
Núverandi normering til 3. fl. er 1,315 starvsfólkatíma pr. barn, ið er 63,12 starvsfólkatímar fyri 48 børn. Við at flyta frítíðartilboðið út úr núverandi bygningi og á aðra staðseting, so er ikki møguligt at gagnnýta starvsfólkanormeringina á tvørs við frítíðarskúlan og fyri at kunna útinna góðsku í námsfrøðiliga arbeiðinum, má víkjast frá normeringini. Mælt verður til, at játta normering til 75 starvsfólkatímar (2 námsfr. og 1 hjálparfólk) fyri at kunna veita eitt gott námsfrøðiligt tilboð í Lonunum í Hoydølum. Hetta er ein meirjáttan á núverandi á 11,88 tímar hvørja viku (fyri 48 børn) kr. 137.548 árliga. Afturat hesum kemur útreiðslan til 10 reingerðartímar vikuliga uml. kr. 60.000.

Millummáltíðin til børnini má gerast í frítíðarskúlanum í Hoyvík, og skal flytast oman í Hoydalar hvønn dag, sum er ein meirútreiðsla. Møguleiki er ikki at gera millummála í Hoydølum.

Eksternar útreiðslur eru harumframt til lønir av klárgering, t.e. uppsetan, rudda, reingerð o.a. í hesum sambandi eru ikki íroknaðar.

**Framtíðin**

Tilboðið til 3. flokk hevur vegna lægri normering sum heild ilt við at bjóða eitt tilboð, ið svarar til frítíðarskúlatilboð, ið lagt varð upp til, við verkstøðum, ítrótti og spæli. Støðu skal tí takast til, um 3. flokstilboðið skal gerast eitt varandi tilboð, har endalig loysn eisini verður fingin á hølisviðurskiftunum. Spurningurin um broyting í normering til tilboðið kann takast upp í sambandi við endurskoðanina av fíggingarleistinum á dagstovnaøkinum, sí mál 17/02486.

**Tilmæli:**

Trivnaðaðarstjórin og leiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildini mæla til,

- At frítíðartilboðið til 3. flokk í kommununi verður skipað sum varandi tilboð við hóskandi og varandi høliskarmum
- At frítíðartilboðið til 3. flokk í Frítíðarskúlanum í Hoyvík komandi skúlaár verður staðsett í lonunum í Hoydølum við eyka tímanormering og til reingerð svarandi til í alt kr. 200.000 um árið at fíggja av kontu 3216 verkætlanir á ungdómsøkinum

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við at 3. flokkur verður skipaður sum varandi tilboð og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum um frítíðartilboð til 3. flokk í Frítíðarskúla-num í Hoyvík í nærumhvørvinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 67/19 Heildarloysn fyri kommunulæknaviðtalur í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 20.06.2018 | 29/18 | 18/02331-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 208/18 | 18/02331-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 153/18 | 18/02331-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 14.03.2019 | 12/19 | 18/02331-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 79/19 | 18/02331-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 67/19 | 18/02331-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur hølir til 13 kommunulæknaviðtalur. Seinnu árini hevur verið vaksandi tørvur á fleiri kommunulæknum í kommununi við tað, at fólkatalið er nógv vaksið. Landsstýriskvinnan í heilsumálum hevur játtað at seta 2 kommunulæknastørv í TK, tá hølir eru tøk til hetta.

Sambært Heilsutrygd so verða teir 4 kommunulæknarnir í Miðlon, sum allir starvast niðursetta tíð, settir fulla tíð og dekka harvið eitt av nýggju kommunulæknastørvunum, sum er játtað til TK.

Hitt starvið bíðar til Tórshavnar kommuna hevur tíðarhóskandi viðtaluhølir at vísa á.

Ábyrgdarbýtið millum land og kommunur á kommunulæknaøkinum er ásett í l*óg um kommunulæknaskipan*, har tað er ásett, at Heilsutrygd setir kommunulæknar og avloysarar í starv, og at kommunurnar útvega og rinda viðtaluhølir við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknan. Krøvini til kommunurnar hesum viðvíkjandi eru so aftur útgreinað í *kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum.*

Umsitingin hevur í eina tíð arbeitt miðvíst við at finna hóskandi loysnir á bráðfeingis trupulleikanum, sum er at finna høli til nýggjan kommunulækna og at endurnýggja viðtalurnar á Frúutrøð og í Berjabrekku, sum ikki longur eru mettar tíðarhóskandi.

Fleiri atlit eru at taka í tílíkum máli. Hølini skulu lúka í minsta lagi tey krøv, sum kommunan sambært omanfyristandandi lóg um kommunulæknaskipan, hevur skyldu til.

Við støði í samskiftinum við kommunulæknarnar er greitt, at formliga grundalagið, her serliga viðvíkjandi kunngerðarkrøvum um høli, als ikki er í samsvari við faktiska virksemið í fleiri av viðtalunum. Fleiri kommunulæknar hava eitt nú útbúgvingarlækna starvandi í viðtaluni, men lóg og kunngerð fyrihalda seg ikki til økta hølis- og rakstartørvin, ið hesin hevur við sær. Samstundis er hetta tó við at betra um tænastuna til borgaran og av størsta týdningi til tess at fáa til vega nýggjar kommunuæknar. TK hevur tí lagt upp fyri, at minstukrøvini til hølir í ávísan mun víkja frá kunngerðini.

At finna eina skjóta og góða loysn á málinum, hevur eisini verið eitt atlit. Umsitingin hevur somuleiðis lagt seg eftir at finna fíggjarliga skynsama loysn.

Av teimum møguleikum sum umsitingin hevur kannað, metir umsitingin at besta loysnin er at leiga bygning í Hoyvík sum verður innrættaður til 5 kommunulæknaviðtalur (3+2).

Talan er um bygning á Kirkjustræti 2. Bygningurin stendur í løtuni í gerð, og kommunan fær tí høvi at innrætta bygningin eftir egnum ynski. Sostatt kann bygningurin verður innrættaður soleiðis, at hann beinanvegin verður gjørdur til kommunulæknaviðtalur og ikki skal byggjast um.

Bygningurin er umleið 1250 fermetrar til støddar í tveimum hæddum og góð parkeringsviðurskifti eru runt um bygningin (39 pláss). Tað er góð atkomuviðurskifti til báðar hæddir í bygninginum.

Byggideildin metir, at bygningurin er væl egnaður til endamálið. Av tí at bygningurin longu stendur uppi og arbeiðið við at gera bygningin lidnan er í gongd, fer hetta at minka um bíðitíðina eftir at sleppa inn í bygningin, í mun til um talan var at byggja nýggjan bygning ella at leiga bygning, har kostnaðarmiklar umbyggingar og umvælingar skulu gerast.

Tórshavnar kommuna fær til vega tekning til innrættingina og ráðgeving um krøv til innrætting, so sum ljós og ljóð viðurskifti, luftskifti o. s. fr. Í leigusáttmálanum verður viðmerkt, at útleigarin skal tryggja at tey krøv, sum verða sett til bygningin og innrættingina verða lokin, og at útleigarin hevur ábyrgdina, um hetta ikki verður lokið.

Útleigarin ger bygningin kláran til innflyting eftir tekningum, sum TK fær tilvega. Væntandi verður bygningurin klárur til innflyting um eitt ár. Leigusáttmálin tekur við, tá bygningurin er klárur at flyta inn í.

Leigugjaldi verður 1280 kr. pr. fermetur umframt árliga prístalsregulering, tó í minsta lagi 1% og leigusáttmálin verður fyri 15 ár. Sí fylgiskjal við leigukostnaðinum fyri 15 ár.

Ein ávís upphædd verður at seta av til innbúgv, útgerð til viðtalurnar og til ráðgeving og tekningar. Enn er ikki klárt at siga neyvt, hvør upphædd talan verður um, men væntast kann at hetta verður áleið 5 milliónir og verður henda uppphædd at taka við í fíggjarætlanina fyri 2019, tá umsitingin hevur fingið gjørt neyvari útrokningar.

Viðvíkjandi rakstrinum av kommunulæknaviðalum hækkar hesin sjálvsagt, tí talið av viðtalum økist, tá eitt nýtt starv verður sett og talið av viðtalum fer úr 13 upp í 14.

Annars verður mett, at raksturin av bygninginum, hiti, ljós og reingerð o.s. fr. helst ikki hækkar munandi við tað, at raksturin av verandi viðtalum verður fluttur til nýggju viðtaluna, tá gomlu viðtalurnar vera niðurlagdar.

Heilsutrygd er kunnað um ætlanina og metir Heilsutrygd, at hetta er ein góð loysn. Í sjálva innrættingina verða umboð fyri kommunulæknarnar tikin við.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, virkandi tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla Trivnaðarnevndini til at heimila umsitingini at gera leigusáttmála við útleigaran av Kirkjustræti 2, har leiguprísurin er 1280 kr uttan mvg. fermeturin og at sáttmálin tryggjar at krøvini til kommunulæknaviðtalur eru lokin. Harafturat at seta fígging av til innbúgv, tól o.a. á fíggjarætlanini 2019 og at leggja málið fyri Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen og Annfinn Brekkstein:

Mælt verður til, at somu tekningar, sum nýttar vórðu í samband við læknaviðtaluhølini í Gundadali verða nýttar í sambandi við útboð í umvendari lisitatión við tí endamáli at byggja nýggj læknaviðtaluhøli á grundøki hjá Tórshavnar kommunu á Oknarvegi.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 20. juni 2018, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Heilsutrygd hevur boðað frá, at tað ikki longur ber til at hava 4 læknar í verandi viðtaluhølum í Miðlon og at tey í samband við at nýggj læknahøli verða tøk í Kirkjustræti, ætla at skipa økið soleiðis at bert tríggir kommunulæknar húsast í Miðlon. Upprunaliga var ætlanin at tríggir kommunulæknar skuldu vera í Miðlon, men teir læknar sum fluttu inn har av fyrstani tíð, ynsktu at arbeiða niðursetta tíð og at deila tey trý læknastørvini í millum 4 læknar sum skuldu halda til í Miðlon.

Av tí at fólkatali í Tórshavnar kommunu er økt nógv seinnu árini, hevur Heilsumálaráðið uppraðfest øki við tveimum nýggjum kommunulæknastørvum. Tað eina starvið er ætlanin at seta, tá klárt er at flyta inn í Kirkjustræti. Hina normeringina hevur Heilsutrygd brúkt til at uppnormara tey fýra læknastørvini í Miðlon og hevur hetta við sær, at hølini nú eru ov lítil til virksemi hjá fýra fulltíðarsettum læknum.

Heilsutrygd hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at varðveita viðtaluhølini í Berjabrekka til ein kommunulækna.
Um áheitanin verður gingin á møti verður ein viðtala í Berjabrekku, 4 viðtalur í Gundadali, 3 viðtalur í Miðlon og 5 viðtalur í Kirkjustræti, umframt at ein viðtala er í Kollafirði.

Henda loysnin kann setast í verk tá Kirkjustræti er liðugt, væntandi í aug. í 2019. Heilsutrygd metir at við hesari loysnini eru góðir møguleikar at fáa øll læknastørvini í Tórshavnar kommunu sett við føstum kommunulæknum.

Umsitingin hevur verið í samband við eigaran av Berjabrekku og til ber at halda fram við leigumálinum.

Við at halda fram at leiga hølini í Berjabrekku verður rúm eisini fyri klinisku diætistunum. Í løtuni eru klinisku diætistarnir staðsettir í viðtalunum í Miðlon og í Gundadali.

Heilsutrygd, klinisku diætistarnir og kommunulæknarnir hava fleiri ferðir gjørt vart við vánaligu umstøðurnar hjá kliniskum dietistunum og hava heitt á kommununa um at sýna vælvild og veita kliniskum dietistum betur umstøður. Hóast kommunan ikki hevur beinleiðis skyldu at veita kliniskum diætistinum hølir, so stendur í Kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum broytt við kunngerð nr. 19 frá 21 mars 2017 í § 1 stk. 4 at Kommunan eigur harumframt at vísa hóskandi umhugsni fyri møguleikanum hjá kommunulæknum at arbeiða saman við øðrum fakbólkum innan primera heilsuøki.

Við framhaldandi leigumálið í Berjabrekku ber til at hýsa kliniskum dietistum í tí einu viðtaluni sum verður tóm, tá flutt verður í Kirkjustræti.

Leiguútreiðslurnar í Berjabrekku er roknaðar inn í fíggingina av leigumálinum í Kirkjustræti. Tað er tí ikki sett fígging av til leigumáli í Berjabrekku. Um leigumálið ikki verður uppsagt, kann leigugjald fyri Berjabrekku gjaldast av rakstrinum fyri 2019, men hædd má takast fyri øktu útreiðslunum í komandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorganartænastuni mæla trivnaðarnevndini til at taka undir við, at halda fram við leigumálinum í Berjabrekku eftir ynski frá Heilsutrygd. Samstundis at taka undir við at klinisku diætistarnir fáa bjóða at flyta sítt virksemi inn í Berjabrekku. At leigumálið verður fíggjað av rakstrinum fyri 2019 og at hædd verður tikin fyri útreiðslunum í fíggjarætlanini í 2020 og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Trivnaðarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Jákup Dam og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, atkvøður blankt, vísandi til at minnilutin hevur lagt uppskot fram at byggja nýggj læknahøli.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Ein meiriluti Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn samtykti at taka undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á uppskotið hjá minnilutanum um at byggja nýggj læknahøli.

**Ískoyti:**
Heilsutrygd hevur boðað frá, at tað ikki longur ber til at hava 4 læknar í verandi viðtaluhølum í Miðlon og at tey í samband við at nýggj læknahøli verða tøk í Kirkjustræti, ætla at skipa økið soleiðis at bert tríggir kommunulæknar húsast í Miðlon. Upprunaliga var ætlanin at tríggir kommunulæknar skuldu vera í Miðlon, men teir læknar sum fluttu inn har av fyrstani tíð, ynsktu at arbeiða niðursetta tíð og at deila tey trý læknastørvini í millum 4 læknar sum skuldu halda til í Miðlon.

Av tí at fólkatali í Tórshavnar kommunu er økt nógv seinnu árini, hevur Heilsumálaráðið uppraðfest øki við tveimum nýggjum kommunulæknastørvum. Tað eina starvið er ætlanin at seta, tá klárt er at flyta inn í Kirkjustræti. Hina normeringina hevur Heilsutrygd brúkt til at uppnormara tey fýra læknastørvini í Miðlon og hevur hetta við sær, at hølini nú eru ov lítil til virksemi hjá fýra fulltíðarsettum læknum.

Heilsutrygd hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at varðveita viðtaluhølini í Berjabrekka til ein kommunulækna.
Um áheitanin verður gingin á møti verður ein viðtala í Berjabrekku, 4 viðtalur í Gundadali, 3 viðtalur í Miðlon og 5 viðtalur í Kirkjustræti, umframt at ein viðtala er í Kollafirði.

Henda loysnin kann setast í verk tá Kirkjustræti er liðugt, væntandi í aug. í 2019. Heilsutrygd metir at við hesari loysnini eru góðir møguleikar at fáa øll læknastørvini í Tórshavnar kommunu sett við føstum kommunulæknum.

Umsitingin hevur verið í samband við eigaran av Berjabrekku og til ber at halda fram við leigumálinum.

Við at halda fram at leiga hølini í Berjabrekku verður rúm eisini fyri klinisku diætistunum. Í løtuni eru klinisku diætistarnir staðsettir í viðtalunum í Miðlon og í Gundadali.

Heilsutrygd, klinisku diætistarnir og kommunulæknarnir hava fleiri ferðir gjørt vart við vánaligu umstøðurnar hjá kliniskum dietistunum og hava heitt á kommununa um at sýna vælvild og veita kliniskum dietistum betur umstøður. Hóast kommunan ikki hevur beinleiðis skyldu at veita kliniskum diætistinum hølir, so stendur í Kunngerð um støðið, viðlíkahald, rakstur o.a. av viðtaluhølum hjá kommunulæknum, sum broytt við kunngerð nr. 19 frá 21 mars 2017 í § 1 stk. 4 at Kommunan eigur harumframt at vísa hóskandi umhugsni fyri møguleikanum hjá kommunulæknum at arbeiða saman við øðrum fakbólkum innan primera heilsuøki.

Við framhaldandi leigumálið í Berjabrekku ber til at hýsa kliniskum dietistum í tí einu viðtaluni sum verður tóm, tá flutt verður í Kirkjustræti.

Leiguútreiðslurnar í Berjabrekku er roknaðar inn í fíggingina av leigumálinum í Kirkjustræti. Tað er tí ikki sett fígging av til leigumáli í Berjabrekku. Um leigumálið ikki verður uppsagt, kann leigugjald fyri Berjabrekku gjaldast av rakstrinum fyri 2019, men hædd má takast fyri øktu útreiðslunum í komandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúin í Heilsu- og umsorganartænastuni mæla trivnaðarnevndini til at taka undir við, at halda fram við leigumálinum í Berjabrekku eftir ynski frá Heilsutrygd. Samstundis at taka undir við at klinisku diætistarnir fáa bjóða at flyta sítt virksemi inn í Berjabrekku. At leigumálið verður fíggjað av rakstrinum fyri 2019 og at hædd verður tikin fyri útreiðslunum í fíggjarætlanini í 2020 og at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 14. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 3 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen,  Bergun Kass, Odd Færø, Halla Samuelsen og Bjørg Dam.

Blankt akvøddu: Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø og Annfinn Brekkstein.

# 68/19 Lendisgøtur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 40/18 | 18/00992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 81/18 | 18/00992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 67/18 | 18/00992-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 36/19 | 18/00992-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 83/19 | 18/00992-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 68/19 | 18/00992-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein mió. kr. eru avsettar á íløgum 2018 til lendisgøtur og verður mælt til at gera hesa raðfesting:
1. Sandá heimari partur av gøtuni 765 m
2. Part av 235 m ringgøtuni í Villingadalsfoss.

Kostnaður er mettur til 1 mió. kr.

Ad. 1. Framhald og nýgerð av gøtu við Sandá, nýgerð av gøtu uml. 765 m.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Ad. 2. Nýgerð av gøtu við Villingadalsfoss, niðan á fossin. So langt sum 235.000 kr. røkka.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Havast skal í huga ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging. Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til framhaldandi gerð av lendisgøtum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í 2019 er ætlanin at fara undir gøtuna við Sandá, sum varð sett á breddan í 2018, umframt gøtuna frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali.

Fyri gøtuna við Sandá hevur umsitingin í 2018 fingið til vega tilboð, áljóðandi 2.9 mió. kr. Arbeiðið varð raðfest í 2018, og er nakað av arbeiðinum longu gjørt. Játtanin í 2019 skal fevna um írestandi fígging, soleiðis at allur teinurin kann raðfestast.

Gøtan frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali er mett til at kosta einar 500.000 kr.

Írestandi fígging fyri 2019 sæst niðanfyri:

| | |
|---|---:|
| Gøta við Sandá | 2.900.000 kr. |
| Gøta við Sandá (goldið) | 701.250 kr. |
| Gøta Villingadal (meting) | 500.000 kr. |
| Írestandi játtan fyri 2018 | 1.200.000 kr. |
| **Eftir at játta fyri 2019** | **1.500.000 kr.** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 1.5 mió kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 69/19 Træplanting 2019, løguætlan 6275

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 38/19 | 19/00558-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 84/19 | 19/00558-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 69/19 | 19/00558-2 |

**Upprunin til málið:**
Skotið verður upp at fremja gróðurseting av 10.000 trøum og runnum á hesum økjum:
- Skúlin á Fløtum
- Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin og í Hoyvík
- Myllutjørn/Dalurin Langi,
- Og øðrum økjum, so sum á Argjum og á Signabø

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ásannað verður at viðarvøkstir, trø og runnar skapa lívd, og gera fjølbroytni í umhvørvinum. Flottar summar- og vetrarmyndir, við vøkrum, vár- og heystarlitum, ið mynda gongdina í árinum. Frítíðar- og fríluftslívsumstøðurnar betrast, til spákingartúrar, rørsluítriv, íðkan og motión, upplivingar at merkja ymisleikan í veðrinum. Harumframt eisini møguleikar hjá fuglum at líva sær og reiðrast og fjølbroytni og margfeldni í floru og faunu. Í okkara grannalondum verður eisini ásannað, at viðarvøkstir gera mun at binda $CO_2$.

- 4000 stk. trø og runnar við nýggja Skúlan á Fløtum. Ætlanin er í samráð við verkætlanarbólkin av Skúlanum á Fløtum, skúlaumsitingina, børn og ung, og umhvørvisdeildina at seta plantingina á skrá nú í vár, soleiðis at trøini og runnarnir eru komin nakað fyri seg, tá skúlin letur upp á sumri 2020. Byggiverkætlanin fevnir um eina plantiætlan, og er partur av jørðarbeiðinum longu gjørt, soleiðis at tað er klárt at planta. Enn væntar tó neyv lýsing av, hvørji trø og runnar skulu plantast, umframt planleggingin av plantingini saman við umsitingini í skúlanum/skúlabørnunum. Kostnaðarmeting fyri plantingina er áljóðandi 200.000 kr. og tá er partur av verkætlanini goldin av byggiverkætlanini.

- 4000 stk. trø og runnar við báðar kirkjugarðarnar, Velbastaðvegur og í nýggja kirkjugarðinum í Hoyvík. Ætlanin er at planta 2000 plantur í hvørjum av kirkjugørðunum, nú teir báðir verða lidnir. Plantingarætlan ikki endaliga staðfest, og skal hetta gerast, áðrenn plantingin kann setast í gongd, men er ætlanin at náa at seta plantingina í gongd í vár. Kostnaðarmeting fyri planting av 4000 trøum og runnum er áljóðandi 200.000 kr.

- 1000 stk. trø og runnar í fríøkjunum við Myllutjørn/Dalurin Langi. Ynskiligt er, at fríøkið við Karlamagnusarbreyt Myllutjørn og partar av Dalinum Langa verður gróðursett, soleiðis at økini verða hugalig og mennandi at uppihalda sær í. Kostnaðarmeting fyri plantingina er áljóðandi 50.000 kr.

- 1000 stk. trø og runnar í fríøkjum annars t.d. Signabøur, Argir. Harafturat eru fleiri økir, ið ynskja meiri planting, og er ætlanin at raðfesta hesa plantingina í 2019. Kostnaðarmeting fyri planting av 1000 trøum og runnum er áljóðandi 50.000 kr.

Samlaður kostnaður fyri plantukeyp og gróðurseting er áljóðandi 500.000 kr. Sí viðheftu kortskjøl, sum lýsa ætlaðu plantingina.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. mars 2019 | Blað nr.: 303<br>Formansins merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotunum at raðfesta keyp og gróðurseting av plantum sambært omanfyri nevndu ætlan, og at játta 500.000 kr. av konto 6275, L00001 til planting í 2019 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 70/19 Heimsmálini hjá ST - Global Agenda 2030

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.02.2019 | 10/19 | 19/00172-1 |
| 2 Vinnunevndin | 11.03.2019 | 16/19 | 19/00172-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 10/19 | 19/00172-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 99/19 | 19/00172-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 41/19 | 19/00172-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 14.03.2019 | 9/19 | 19/00172-1 |
| 7 Eldranevndin | 19.03.2019 | 3/19 | 19/00172-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 81/19 | 19/00172-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 70/19 | 19/00172-1 |

**Upprunin til málið:**
Sameindu Tjóðir (ST) vísa á 17 mál, ið fyri ár 2030 kunnu skapa ein betri heim. Altjóða átakið, sum byrjaði í 2015, verður kallað Heimsmál fyri burðardyggari menning - "The 2030 Agenda for Sustainable Development" ella "Global Agenda 2030".

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Heimsmálini eru 17 í tali, ið hava til endamáls, at allar heimsins tjóðir stremba ímóti einum burðardyggum samfelagi og burðardyggum heimi, t.v.s. at øll lond mennast búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga á ein burðardyggan hátt. Hugsjónin er, at øll heimsins lond skulu arbeiða við at røkka hesum 17 málum í 2030.

Føroya Landsstýri hevur eisini sett Heimsmálini hjá ST á skrá í Føroyum, og eru heimsmálini týdd til føroyskt. Til tey 17 yvirskipaðu heimsmálini eru 169 undirmál. Sí viðløgdu føroysku týðingina av heimsmálunum.

Nógvar kommunur í norðurlendskum høpi hava longu tikið heimsmálini til sín og hava implementera hesi á kommunalum støði, og enn fleiri kommunur eru í ferð við at seta Heimsmálini hjá ST á skrá.

Ikki øll heimsmál eru eins viðkomandi fyri Tórshavnar kommunu. Nøkur av teimum heimsmálum, sum eru viðkomandi, eru eitt nú burðardygg orka, góð heilsa og vælferð, burðardyggir býir og bygdir v.fl. Meðan onnur heimsmál eru meiri viðkomandi fyri lond, sum stríðast við fátækradømi, javnstøðurættindum o.ø.

Ymiskt er, hvussu kommunur arbeiða við heimsmálunum. Sum dømi kann nevnast, at Gladsaxe kommuna hevur íverksett heimsmálini í sonevnda 'Gladsaxestrategien' og arbeiðir miðvíst við heimsmálunum í samstarvi við m.a. stovnar og fyritøkur í kommununi. Í Gladsaxe kommunu hava tey í fyrstu atløgu valt at seta fokus á 7 av heimsmálunum. Sigast kann, at Gladsaxe kommuna er ein av førandi kommununum í Danmark at arbeiða við heimsmálunum. Sí viðlagda skjal um 'Gladsaxestrategien'.

Umhvørvispolitikkurin 'Grøna Leiðin' hjá Tórshavanr kommunu samsvarar væl við fleiri av heimsmálunum hjá ST, og tískil hevur umhvørvisdeildin í ein vissan mun arbeitt við heimsmálunum. Millum annað luttók starvsfólk á umhvørvisdeildini á ráðstevnu um heimsmálini í Helsinki í november 2016. Ráðstevnan snúði seg í høvuðsheitum um hvussu kommunur í norðurlondum kunnu samstarva viðvíkjandi Heimsmálunum hjá ST.

Í 2017 vóru somuleiðis forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, leiðarin og starvsfólk á umhvørvisdeildini á vitjan á Afdelingen for Bæredygtig Udvikling í Københavns kommunu, har tey góvu innlit í, hvussu tey arbeiða við ymiskum umhvørvisverkætlanum við støði í heimsmálunum. Tilgongdin hjá teimum var serliga at fremja verkætlanir á skúlum og dagstovnum fyri at læra og eggja børnum til ein burðardyggan lívshátt.

Við verkætlanum og átøkum innan 'Grønu Leiðina' er Tórshavnar kommuna við í norðurlendskari frágreiðing (Global goals for local priorities: The 2030 Agenda at local level), sum lýsir hvussu nakrar norðurlendskar kommunur arbeiða við heimsmálum hjá ST. Les um umhvørvispolitikkin hjá Tórshavnar kommunu á s. 38 sí viðløgdu frágreiðing.

Umhvørvisdeildin arbeiðir við at samantvinna Grønu Leiðina og heimsmálini hjá ST og at gera ein felags leist fyri umhvørvispolitikkin og heimsmálini og á henda hátt sjónliggera, at Tórshavnar kommuna arbeiðir miðvíst við heimsmálunum á umhvørvisøkinum.

Umhvørvisdeildin metir eisini, at tað hevði verið skilagott, at Tórshavnar kommuna í síni heild setir Heimsmálini hjá ST á dagsskrá, og at aðrar deildir og stovnar somuleiðis arbeiða við heimsmálunum. Fyri at íverkseta heimsmálini í Tórshavnar kommunu er í fyrstu atløgu neyðugt at eyðmerkja, hvørji heimsmál eru av týdningi fyri Tórshavnar kommunu, t.d. við at seta ein arbeiðsbólk við umboðum frá ymiskum deildum/stovnum.

**Umhvørvisárin**
Samfelagslig burðardygg menning er til gagn fyri menniskju, náttúru og umhvørvi.

**Skjøl:**
- Heimsmálini á FO (januar 2019)
- Gladsaxestrategien 2018-2022
- Global goals for local priorities: The 2030 Agenda at local level, Nordregio report 2018:2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at náttúru- og umhvørvisnevndin tekur undir við, at Heimsmálini hjá ST verða partur av Grønu leiðini og at seta heimsmálini hjá ST á dagsskrá í Tórshavnar kommunu og at beina málið í politisku nevndirnar og í býráðið til samtyktar.

Mælt verður til at seta ein arbeiðsbólk við umboðum frá ymiskum deildum í umsitingini, og at býráðið velur ein tilhoyrandi stýrisbólk við tí endamáli at íverkseta Heimsmálini hjá ST í Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 11. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Trivnaðarnevndin 14. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Eldranevndin 19. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 71/19 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 877m við Dalastíg, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 249/18 | 18/03670-2 |
| 2 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 322/18 | 18/03670-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 43/19 | 18/03670-2 |
| 4 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 71/19 | 18/03670-2 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin í Tórshavnar kommunu samtykti á fundi 3. oktober 2018 at loyva íbúðarbygging á matr. nr. 877m, við Dalastíg, Tórshavn, og í hesum sambandi at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið sí 18/03680-3 Kortskjal 1 yvirlitskort og 18/03670-04 SERSTØK BYGGISAMTYKT VIÐ DALASTÍG.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn frá eigara av matr. nr. 877m, Tórshavn, um at fáa loyvi at byggja íbúðir á økinum. Talan er um tveir íbúðarbygningar í tveimum hæddum, við tilsamans 12 íbúðum, 6 íbúðir á 74 m² og 6 íbúðir á 57 m².
Størri bygningurin verður 224 m² til víddar, og minni bygningurin 150 m².
Pláss verður fyri 16 p-plássum inni á ognini. Sambært almennu byggisamtyktini skal minst 1 p-pláss verða fyri hvørjar 75 m$^2$ íbúð, og eru sostatt fleiri p-pláss, enn minstakravið í almennu byggisamtyktini. Harumframt er øki lagt av til felags tún, sí kortskjalið 18/03670-3 Skipan. Ognin liggur á horninum Dalavegur/Vestari Ringvegur og vegatkoma verður frá Dalastígi.

Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri A1 øki *"kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir".*

Um verkætlanina skrivar umsøkjarin:
*"Arkitektoniska hugskotið tekur støði í staðnum. Dalastígur liggur á einari hædd við góðum útsýni út á Nólsoyarfjørð (suður, eystur). Vit hava lagt 2 stengur, ið liggja forskotnar i mun til hvørja aðra. Miðgarðurin trappar [skráar] oman við lendinum og húsalonirnar liggja sostatt við opna skapinum suðureftir. Trappaða [tað skrá] miðrúmið er hugsað sum ein felagsgarður fyri búðfólkið."* Sí 18/03670 Kortskjal 2 skipan av økinum.

Eystanfyri matrikul 877m liggur eitt tætt bústaðarøki sett saman av einamest stakhúsum. Vestari Ringvegur sker vestaru síðuna av matriklinum av við vegi og hinumegin vegin, vestanfyri matrikulin, er eitt grønt øki, ið somuleiðis er eitt A1-øki til bústaðarbygging. Í mun til ljósviðurskifti og útsýni verður ikki mett, at íbúðarbygningarnir koma at ávirka grannalagið.

Serstaka byggisamtyktin tryggjar fleiri íbúðir í býnum og býartættar í ein ávísan mun, og er hon sostatt í tráð við bústaðarpolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1

Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eru millum annað:

*1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.*

*Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03503 Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr. nr. 877m, Dalastígur 21, Tórshavn

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Økið er viðgjørt eftir umhvørvisflokki 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
18/03670-4 SERSTØK BYGGISAMTYKT VIÐ DALASTÍG
18/03670-3 Kortskjal 1 yvirlitskort
18/03670-3 Kortskjal 2 skipan av økinum
18/03670-3 Skipan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | x | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til, at nevndin góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri Dalastíg, sambært viðheftu skjølum, og beinir málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina um uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt til íbúðarbygging á matr. nr. 877m við Dalastíg, hevur Tórshavnar kommuna fingið eitt mótmælisskriv, sí skjal *Mótmæli frá íbúgvum.*

Umboð fyri grannaognirnar seta í høvuðsheitum fram hesar viðmerkingar og sjónarmið í mótmælisskrivinum:

1. Fýlst verður á, at tøtt íbúðarbygging verður framd á so lítlum øki, ið fer fullkomiliga at broyta dámin av økinum, ið ber dám av vanligari sethúsa bygging. Grannar væntaðu, at eini sethús ella tvíhús fóru at koma á økið, men at 12 íbúðir skulu byggjast, hevði eingin teirra væntað.

2. Ivamál eru um verandi vegirnir fara at tola øktu ferðsluna, ið fer at standast av 12 íbúðum. Spurt verður um kommunan hevur gjørt nakra ítøkiliga kanning av ferðsluviðurskiftunum í sambandi við íbúðarverkætlanina?

3. Á strekkinum millum Dalastíg og Dalavegin er ongin gongubreyt ella nøktandi breidd til at tveir bilar kunnu koyra í senn. Pláss er ikki fyri vendiplássi og parkering í ovara parti av Dalastígi. Íbúgvarnir duga tí ikki at ímynda sær, hvussu ferðsla og parkeringsviðurskiftir skulu rúmast.

4. Íbúgvarnir í matr.nr.877l, stúra fyri at slík íbúðarbygging kemur at skugga allan havan og fer at geva íbúgvunum í íbúðarbyggjarínum beinleiðis útsýni inn á ognina, ið kemur at verra um liviumstøðurnar á matr. nr. 877l.

5. Ónøgdsemið stendst eisini av, at eingin persónlig kunning hevur verið til nærmastu grannar serliga tá ið ein so stór byggiætlan fyriliggur so tætt uppat eini ogn.

6. Meta ikki at ognin matr.nr. 877m er eitt natúrligt avmarkað øki, ið kann geva loyvi at byggja íbúðir við serstakari byggisamtykt.

Umsitingin hevur viðgjørt mótmælið, og eru viðmerkingar og sjónarmið ikki grundað á galdandi reglur og byggisamtyktir, sum skipað verður til, tí talan er ikki um eina broyting av verandi byggisamtykt, men um eina nýggja serstaka byggisamtykt.

Ad. 1 - Ein slík íbúðarbygging viðførir fleiri bústaðir og býartætting og er sostatt í tráð við bústaðarpolitikkin hjá kommununi. At tað kemur íbúðarbygging, noyðist ikki at vera eitt neiligt árin á grannalagið, men førur við sær ein meir fjølbroyttan skara av bygging í heildarmyndini av grannalagnum.

Innkomna uppskotið uppá íbúðarbygging tekur sítt arkitektoniska støði í staðnum og brúkar dygdirnar í økinum. Lonirnar báðar leggja seg oman gjøgnum lendið við einum opnum miðgarði, ið trappar niður og fylgir lendinum. Uppskotsskitsan vísir á eitt einfalt snið. Sí skjal *Raðhús 01.02.2019 Perspektiv* og *perspektivskitsa.*

Nevnast kann, av tí at matr. nr. 877m liggur í A1 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini og er heili 1900 $m^2$ til støddar, tá ber til at sundurbýta og uppføra trý tvíhús á matriklinum, har hvørt tvíhús hevur møguleika at innrætta íbúð við tilhoyrandi parkeringsplássi. Hetta merkir, at 12 búlendir við tilhoyrandi parkeringsplássum kunnu í høvuðsheitinum búleikast á sama øki við verandi byggisamtykt.

Ad. 2 - Umsitingin á teknisku deild hevur mett um fyrispurningin og mett verður at vegakervið fer at megna nýggja inntrivið.

Broyting verður sjálvsagt á vegakervinum rundan um matr. nr. 877l, í tí at parkeringspláss vera gjørd í sambandi við íbúðarbyggjaríið, sí skjal *Raðhús 01.02.2019 Støðumynd Parkering 1 til 500.pdf.*

Ad. 3 - Umsitingin á teknisku deild hevur mett um støðuna og eru komin til ta niðurstøðu, at parkeringsplássini á strekkinum Dalastígur og Dalavegin koma at leggja seg so langt inná matrikulin, at góð frástøða verður til til- og frákoyring.
Viðvíkjandi plásstroti til vendipláss í ovara parti av Dalastígur, kann hetta loysast við at tilrættaleggja økið annarleiðis, sí skjal *Raðhús 01.02.2019 Perspektiv* og *Raðhús 01.02.2019 Støðumynd Parkering 1 til 500.pdf* og *A001 Støðumynd 1 til 1000.*

Ad. 4 - Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaðarbygging á økinum, sum frammanundan liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er, er økið ætlað til bygging. Grannar í økinum kunnu tískil ikki tryggja sær frítt útsýni, og at hús ikki verða bygd tætt upp at teirra matrikli. Harumframt vera allar vanligar ásetingar um frástøðu frá marki, hædd o.s.fr. hildnar.

Ad. 5 - Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013
*§ 6. 1) Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mugu verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum.*

Øllum er tryggjað smbr. §6 í byggi- og býarskipanarlógini, at koma til orðanna og gera mótmæli til ætlaðar broytingar. Sostatt kunnu grannar og onnur blíva hoyrd, nevniliga við at gera síni møguligu mótmæli galdandi.

Broyting í byggisamtyktum og uppskot til nýggjar serstakar byggisamtyktir eru at meta sum eitt reguleringsamboð og ikki ein vanlig fyrisitingarlig avgerð. Harvið verður tryggjað við lóg, at allir viðkomandi aktørar verða "hoyrdir" í tíðini, har broytingin liggur frammi alment. Tí verða broytingar av byggisamtyktum ikki sendar ávísum borgarum til hoyringar, men til allan almenningin til viðmerkingar.

*"Á vanligan hátt kunngera"* verður lisið sum kunngera á heimasíðu, skal lýsast í avísum og framløgd í fysiskum formi á t.d. Snarskivuni. Tað eru eingi formlig krøv til t.d. at sendast skal skriv til ávísar borgarar. Tað at broyta eina byggisamtykt er at meta sum eitt reguleringsamboð og kann samanberast við "lóggávubroyting" og rakar yvirskipað.

Ad. 6 - Verður hugt at byggingini í nærumhvørvinum so kann íbúðarbygging í økinum tykjast fremmand, men av tí at matrikulin liggur á horninum millum Dalavegin og Vestara ringveg, eru hesir vegir við til at markera hornið øgiliga týðiliga og gera at matrikulin far eitt skap, ið líkist burturúr vanligu sethúsabyggingini í nærumhvørvinum. Skapið á matr.nr.877m ger, at økið væl kann rúma bygging, ið er annarleiðis enn tí sum er bygt í grannalagnum. Serliga tá íbúðarbyggingin verður tilrættaløgd eftir skapinum og lendisviðurskiftunum, eitt nú í lonum sum uppskotið vísir til.

**Nýtt tilfar:**
Umsitingin hevur verið í samband við arkitektarnar handan uppskotið, Brim Arkitektar og fingið útflýggjað nýtt tilfar, ið verður víst til sum skjal *Raðhús 01.02.2019 Perspektiv* og

*Raðhús 01.02.2019 Støðumynd Parkering 1 til 500.pdf.* Nevnast skal, at uppskotið skal sjálvsagt útgreinast neyvari í einum komandi myndugleikaprojekti.

**Skjøl:**
*Journal nr.: 18/03503-1* Umsókn um byggiloyvi til íbúðarbygging á matr. nr. 877m, Dalastígur 21, Tórshavn.
*Journal nr.: 18/03670-10 Svar vegna íbúgvar um ætlan um broyting av serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 877m, við Dalastíg í Tórshavn.*
*Journal nr.: 18/03670-13 Nýtt tilfar frá Brim Arkitektum*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við verandi uppskot um serstaka byggisamtykt við Dalastíg og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 72/19 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir til C3 øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 40/19 | 19/00747-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 72/19 | 19/00747-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við at Almannaráðið hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at vísa á lendi til ymiskar almennar stovnar, er samtykt at selja Almannaráðnum matr. nr. 56a, við Kvíggjartún á Argjum, og hevur Almannaráðið ætlanir um at byggja heim til børn og ung við autismu á økinum.

Matr. nr. 56a, Argir liggur í trimum ymiskum økjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og um loyvi skal verða at byggja almennan stovn á økinum, má almenna byggisamtyktin broytast, soleiðis at allur matrikulin liggur í sama byggisamtyktar øki.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Økið, sum ætlanin er at byggja almennan stovn á, liggur sum C3 øki, ætlað miðstaðendamálum, harímillum almennum stovnum, A1 øki, ætlað lágari bústaðarbygging og 4. Grundumráði, sum í høvuðsheitum skal verða nýtt til landbúnað og alment frílendi, sí skjal *áðrenn broyting*.

Mett verður, at tað hóskar seg best at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at allur matr. nr. 56a liggur sum C3 øki. Hetta grundað á, at størsti parturin av matr. nr. 56a frammanundan liggur sum C3 øki, aðrir almennir stovnar í økinum liggja í C3 øki og at ásetingarnar fyri C3 øki rúma almennum stovnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri A1 øki eru m.a.:
*§5. Stk. 1. Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.*

*Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.*

Ásetingarnar fyri C3 øki eru:
*§22, stk. 1. Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*
*Stk. 2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri alt økið ella ein nattúrliga avmarkaðan part av tí.*
*Stk. 3. Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.*
*Stk. 4. Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.*

Ásetingarnar fyri 4. grundumráði eru m.a.:

*§26, stk 1. 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.*
*Stk. 2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið, sí journal nr. 19/00769 og í henni verður tryggjað, at gøtusambandið frá Hamrinum til Kvíggjartún verður varðveitt.

Í viðgerðini av serstøku byggisamtyktini fyri økið, verður atkoman til matr. nr. 32e, sum er ígjøgnum matr. nr. 56a, somuleiðis umrødd.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Nýggj serstøk byggisamtykt fyri heim til børn og ung við autism við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir*, journal nr. 19/00769.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Áðrenn broyting*, journal nr. 19/00747-2.
*Eftir broyting,* journal nr. 19/00747-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu sambært kortskjali *Eftir broyting*, journal nr. 19/00747-2, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

# 73/19 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 52/19 | 19/00096-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 48/19 | 19/00096-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 86/19 | 19/00096-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 73/19 | 19/00096-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Framlagt.

# 74/19 Dagføring og umlegging av kloakk Landaveg Íslandsveg 2. byggistig

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.09.2017 | 41/17 | 17/02296-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 200/17 | 17/02296-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 218/17 | 17/02296-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 13/19 | 17/02296-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 88/19 | 17/02296-2 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 74/19 | 17/02296-2 |

**Málslýsing:**
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá Tórshavnar Kommunu, er ætlanin at dagføra kloakkleiðingina sum er ein felagsleiðing, frá Perskonugøtu fram við Landavegnum oman í betongkistuna við Frælsið. Kloakkin er úr betong og óvist er nær hon er løgd.

Hesin partur av arbeiðinum umfatar 2. byggistig, at dagføra og umleggja verandi betongleiðing í Landavegnum frá Jøkulstræti og út um Íslandsvegin. Nýggja leiðingin verður gjørd soleiðis, at møguleiki er at regnvatn og kloakk verður sundurskilt.

Martin E. Leo, ráðgevandi verkfr. hevur gjørt útboðstilfar, j.nr. 17/02296-1 og vegna TK bjóðað arbeiðið út í innbodnari lisitatión.
Lisitatiónin var hildin á skrivstovuni hjá MEL, 24. aug. 2017. Inn komu 4 boð. Sp/f Andrias Berg hevði lægsta boð á 3.331.010,- mió.kr.
Umsitingin, saman við ráðgeva, hevur latið gjørt lisitatiónsprotokoll j.nr. 17/02296-4 og innstilling j.nr. 17/02296-6.

**Fíggjarviurskifti:**
Samlaða játtanin av makaðum íløgum fyri kloakkir 2017, konta 6875 er 5 mió. kr.
Sambært fíggjarligu uppgerð, j.nr. 17/02296-7 verður samlaði fíggjartørvurin av íløgum 2,8 mió.kr. fyri arbeiðið.
Mælt verður til at játtað 2,8 mió. kr. og taka av tilboði frá Sp/f Andrias Berg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 2,8 mió.kr. av makaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2017 konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin. Arbeiðið 2. byggistig, at dagføra og umleggja verandi betongleiðing í Landavegnum frá Jøkulstræti og út um Íslandsvegin er liðugt og avhendað 17-12-2018. Eingir manglar vóru staðfestir.

Verkætlanin, konto 6875, L68032 Dagføring av kloakk Landav./Íslandsv. 2 byggistig, er uppgjørd og vísir eitt avlop álj. kr. 38.106,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at avlopsupphæddin á kr. 38.106,- verður sambært galdandi játtanarreglum um avlop av lidnum verkætlanum, flutt frá verkætlanini, konto 6875 L68032 Dagføring av kloakk Landav./Íslandsv. 2 byggistig, at verða tøkt á konto 6875 L00001. At verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

# 75/19 Regnvatnsleiðing úr Marknagili - projekt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Tekniska nevnd | 29.04.2015 | 59/15 | 15/01396-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 123/15 | 15/01396-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 95/15 | 15/01396-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 3/16 | 15/01396-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 18/16 | 15/01396-2 |
| 6 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 25/16 | 15/01396-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.05.2016 | 58/16 | 15/01396-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 171/16 | 15/01396-2 |
| 9 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 153/16 | 15/01396-2 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 206/16 | 15/01396-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 26.07.2017 | 37/17 | 15/01396-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 26.07.2017 | 170/17 | 15/01396-2 |
| 13 Býráðsfundur | 26.07.2017 | 192/17 | 15/01396-2 |
| 14 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 12/19 | 15/01396-2 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 89/19 | 15/01396-2 |
| 16 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 75/19 | 15/01396-2 |

**Málslýsing**:
Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum oman til Sandá fíggjað av langtíðar íløgum fyri kloakkir.

Í sambandi við arbeiðið at byggja skúladepilin í Marknagili, hevur Landsverk gjørt avtalu við kommununa, j. nr. 14/00941/188, um at leggja pening út til fíggingina av arbeiðinum til regnvatnsleiðing v.m.

Útbjóðingartilfarið til 1. byggistig til regnvatnsleiðing úr Marknagili oman í Sandá fór út 20. mars 2015. Avgjørt var at bjóða arbeiðið út í 2 byggistigum.

- Byggistig 1 er frá Landavegnum oman í Sandá
- Byggistig 2 er frá Marknagili til Landaveg.

Grundin til at avgjørt var at bjóða arbeiðið út í tveimum arbeiðstøkum er, at tað er ikki endaliga staðfest, hvussu vegurin verður gjørdur í sambandi við nýggja Vesturskúlan og best hevði verið um regnvatnsleiðingin verður løgd samstundis sum vegurin verður gjørdur.

Teir bjóðandi vóru:

- Articon
- J&K Contractors
- Plan v/Johannes Hellisdal
- Maskinkoyring
- P/F Tórhallur Hansen
- Andrias Berg

Lisitatión varð hildin 13.04.2015. Víst verður til lisitatiónsprotokoll j. nr. 15/01396-3. Av innkomnu tilboðunum var lægsta boðið frá p/f Tórhallur Hansen áljóðandi uml. 6,1 mió. kr.

Umsitingin kunnar um lisitatiónsúrslitið og tilmæli frá rágeva j.nr. 15/01396-4 og um hvussu farið verður undir arbeiðið.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2015:** Kunnað varð um málið. Nevndin samtykti at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Tórhalli Hansen áljóðandi kr. 6.163.000,- og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 21. mai 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í Íløguætlanini fyri 2016 eru avsettar kr. 10,8 mió. til kloakk í Marknagili.
Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum oman til Sandá fíggjað av langtíðar íløgum fyri kloakkir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 10,8 mió. av íløgukarmi fyri kloakkir 6875 - Kloakk í Marknagili - fyri fíggjarárið 2016 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Íbúgvar í grannalagnum í Lìtlagerði hava gjørt vart við at gongubreytirnar í økinum treingja til ábøtur. Arbeiðstakarin hevur givið umsitingini tilboð upp á gerð av gongubreytum og kemur hetta at kosta uml. 0,6 mió. kr.

Eftir sum peningur ikki er tøkur innan játtanina fyri regnvatnsarbeiðið, kann fígging útvegast frá markaðum íløgum til vegir, kto. 8175, fyri fíggjarárið 2016. Tøkar eru kr. 2,3 mió. til ymsar vegaætlanir fyri 2016.

**Tilmæli:**
Vísandi til at stórur tørvur er at fáa dagført gongubreytirnar í Lítlagerði mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at játta kr. 0,6 mió. av íløgum fyri vegir 8175 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 04. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í Íløguætlanini fyri 2016 eru avsettar kr. 10,8 mió. til regnvatnsleiðing úr Marknagili.
Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum í Marknagili oman til Sandá.

Arbeiðið er ein partur av heildarætlanini at leggja regn- og yvirflatuvatn oman í Sandá og harvið minka um vatnnøgdina, sum fer í Rættará.

1. Byggistig er um at verða liðugt og sum framhald av arbeiðinum, 2. Byggistig, j.nr. 15/01396-45, er móttikið undirhondsboð frá P/F Articon, dagf. 19.05.17, áljóðandi kr. 708.170,- u/mvg fyri strekkið A, og kr. 600.294,- u/mvg, fyri strekkið B, j.nr. 15/01396-48.

Umsitingin kunnar um prosjekt og tilmæli frá ráðgeva j.nr. 15/01396-49.

Fíggjarviðurskifti:
Játtaður er peningur til alla verkætlanina, og biðið verður um at man innanfyri verandi fíggjarkarmar fyri kloakkir 6875, L68028 kann taka av tilboði frá Articon áljóðandi kr. 1.308.464,- u/mvg.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá P/F Articon tils. áljóðandi kr. 1.308.464,- u/mvg, fíggjað av verandi íløgu fyri kloakkir 6875 L68028, regnvatnsleiðing úr Marknagili - og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 26. juli 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2017:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. juli 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá Skúladeplinum í Marknagili oman til Sandá er liðugt og avhendað.

1. byggistig frá Landavegnum oman til Sandá, varð avhendað 17.12.2017
2. byggistig frá Landavegnum til Glasir varð avhendað 11-01-2019
3. byggistig inni á skúlaøkinum hjá Glasir, varð avhendað 11-01-19

Allir manglar sum vóru staðfestir eru avgreiddir og góðkendir.

Verkætlanin konto 6875, L68028 Regnvatnsleiðing úr Marknagili er uppgjørd og vísir eitt avlop álj. kr. 155.379,-

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at avlopsupphæddin á kr. 155.379,- verður, sambært galdandi játtanarreglum um avlop av lidnum verkætlanum, flutt frá verkætlanini konto 6875, L68028 Regnvatnsleiðing úr Marknagili, at verða tøkt á konto 6875 L00001. At verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

# 76/19 Nýggj kloakk í Homrum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 30/18 | 18/01776-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 152/18 | 18/01776-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 127/18 | 18/01776-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 06.09.2018 | 5/18 | 18/01776-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 14/19 | 18/01776-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 91/19 | 18/01776-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 76/19 | 18/01776-1 |

**Upprunin til málið:**
Sum partur av spillivatnsætlanini hjá Tórshavnar kommunu, at savna allar kloakkir í skipaðar leiðingar og út á streymasjógv og lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni í sambandi við spillivatnskunngerðina, hevur umsitingin saman við ráðgeva latið gera prosjekt klárt til útbjóðing j.nr. 18/01776-2.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Arbeiðið er partur av spillivatnsætlanini fyri Kollafjørð og er framhald av kloakkini Við Sjógv til Tornes og umfatar økið Í Homrum, Teinur IV. J.nr. 18/01776-2.
Prosjektið umfatar at savna allar kloakkir í økinum í skipaða leiðing, sum er leidd í verandi útleiðing á streymasjógv, Við Sjógv.

Umsitingin ynskir at fáa heimild at bjóða arbeiðið út, taka av lægsta tilboð og seta arbeiðið í gongd í vár.

Mettur fíggjartørvur fyri arbeiðið er 1,2 mió.kr. j.nr. 18/01776-3.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
18/01776-2 Útboðstilfar
18/01776-3 Fíggjartørvur

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin, mæla til at:

- Játta 1,2 mió. kr. av markaðum íløgum fyri kloakkir 2018, konto 6875.
- Bjóða arbeiðið út, taka av lægsta tilboðnum og seta arbeiðið í gongd.
- Beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 06. september 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Arbeiðið at savna kloakkirnar í skipaða leiðing at uppfylla krøvini frá Umhvørvsstovuni er liðugt. Arbeiðið umfatar savnan av kloakkum frá Todnesi til Við sjógv umfatandi økið Í Homrum er liðugt og avhendað 26-11-2018, Eingir manglar vóru staðfestir.

Verkætlanin, konto 6875, L68037 Dagføring av kloakk í Homrum, er uppgjørd og vísir eitt avlop álj. kr. 249.416,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at avlopsupphæddin á kr. 249.416,- verður sambært galdandi játtanarreglum um avlop av lidnum verkætlanum, flutt frá verkætlanini, konto 6875 L68037 Dagføring av kloakk í Homrum, at verða tøkt á konto 6875 L00001. At verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

# 77/19 Arbeiði at dagføra kloakkir í Tórshavnar kommmunu sambært góðkendari spillivatnsætlan til 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Kaldbaksnevndin | 26.02.2014 | 7/14 | 14/01352-11 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 2/16 | 14/01352-11 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 19/16 | 14/01352-11 |
| 4 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 31/16 | 14/01352-11 |
| 5 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 36/16 | 14/01352-11 |
| 6 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 144/16 | 14/01352-11 |
| 7 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 118/16 | 14/01352-11 |
| 8 Tekniska nevnd | 28.11.2017 | 73/17 | 14/01352-11 |
| 9 Fíggjarnevndin | 06.12.2017 | 300/17 | 14/01352-11 |
| 10 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 297/17 | 14/01352-11 |
| 11 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 11/19 | 14/01352-11 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 90/19 | 14/01352-11 |
| 13 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 77/19 | 14/01352-11 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá 7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

Ætlanin fevnir sum kunnugt um:
1. Lýsing av spillivatnsskipanini, íroknað bygnað, tilfar, aldur, reinsing og kloakkeringsøkið
2. Slag og nøgd av spillivatni, ið verður og fer at verða leitt gjøgnum leiðingarnar
3. Útleiðingarstøð og umhvørvi rundanum, t.d. botn- og vatngóðsku og streymviðurskifti
4. Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini
5. Eftirlit og røkt av spillivatnsskipanini
6. Meting um væntaða menning í kommununi hvat fólkatali og ídnaðartilgongd viðvíkur, og hvønn týdning menningin hevur fyri samansetingina og nøgdina av spillivatni, og fyri umhvørvið, ið spillivatnið verður leitt út í
7. Grundgivna raðfesting av nær ætlaða kloakkeringsarbeiðið verður framt, og nær tað væntandi verður liðugt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Grundað á fyribils metingar hevur umsitingin mælt til at raðfesta arbeiðini í nevndu spillivatnsætlan soleiðis, at játtanin var í hesi raðfylgju í 2012: 7,5 mió., í 2013: 7,5 mió. og í 2014: 4,1 mió.

Spillivatnsætlanin fevnir um dagføring av kloakkum í umleið 20 ymsum støðum í allari kommununi og fyri at fáa útgreinað ítøkiligari hvussu fíggjartørvurin fyri hesi arbeiði fer at verða, er ætlanin at fara undir miðvísa projektering av kloakkarbeiðunum í nøkrum av hesum støðum. Eftirfylgjandi verður farið undir tilgongd at fáa fígging til at fremja nevndu kloakkarbeiði.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2013 er 5,7 mió. kr. og ynskir umsitingin við hesum at fáa loyvi at bjóða serstøk økið út til ráðgevandi virki at gera skitsuprosjekt og kostnaðarmeting av ávísum økjum, sum umsitingin vísir á.

Talan er um niðanfyri standandi øki:

1. <u>**Kloakkir í Kollafirði**</u>
   Fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni, er ætlanin at gera arbeiðið liðugt at savna allar kloakkir í Kollafirði, Kollfjarðardali og Hundsarabotni í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Miðað verður eftir at savna so nógvar útleiðingar saman sum møguligt, áðrenn tær verða leiddar út á sjógv minst 1 m undir størstu fjøru. Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørdur, talan er um Norðuri í Sundinum í Líðini og á Oyrareingjum.

2. <u>**Kloakkir í Kaldbak og Kaldbaksbotni**</u>
   Ætlanin er at samla allar kloakkir í Kaldbak í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

   Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt, við Á er útleiðing lóglig. Inn á Gørðum og inni á Fløtum er kloakkin leidd í skipaðar leiðingar.

3. <u>**Kloakkir við Bakkagøtu og á Argjaboða á Argjum**</u>
   Ætlanin er framhaldandi at samla kloakkirnar á Argjum í skipaða leiðing og út á sjógv fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni. Talan er um kloakkútleiðingar við Bakkagøtu og Argjaboða

   Partur av arbeiðinum at fylgja krøvinum fá Umhvørvisstovuni er longu gjørt, við Sjósavnið, við Bátahylin og frá kloakkini frá Kongavarða/Hamrinum.

4. <u>**Kloakkir í Syðradali og Norðadali**</u>
   Henda ætlanin er at samla kloakkirnar ávikavist í Syðradali og Norðadali í skipaða leiðing fyri at lúka krøvunum frá Umhvørvisstovuni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta:
1) kr. 300.000,- til projektering av kloakkum í Kollafirði
2) kr. 150.000,- til porjektering av kloakkum í Kaldbak og Kaldbaksbotni
3) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum við Bakkagøtu og á Argjabooða á Argjum
4) kr. 100.000,- til projektering av kloakkum í Syðradali og Norðadali
ella samanlagt kr. 700.000,- til tey 4 omanfyri standandi arbeiði av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2013, konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini spyrja hvør arbeiðsætlan fyriliggur fyri Kaldbak. Hvussu nógv av teimum 150.000 kr eru brúktar.

**Kaldbaksnevndin 18. september 2013:**Umsitingin kunnaði um at projekteringsarbeiðið er í gongd við atliti til at gera arbeiðið í næsta ár.

**-Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna skal innan 2015 gera ávís kloakkarbeiði, so at kloakkirnar lúka minstukrøvini, ið eru ásett í spillivatnsætlanini sambært kungerð nr. 111 frá 7. september 2009, sum býráðið 1. november 2012 hevur samtykt (sí mál nr. 2010-2190).

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 400.000 til projektering av framfluttum íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012, kt. 6875.

5. <u>**Kloakkir á Hvítanesi**</u>
   Ætlanin er at samla allar kloakkir á Hvítanesi í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

   Størsti parturin at skipa leiðingarnar á Hvítanesi er longu gjørt og er ætlanin at beina hesar leiðingar í góðkenda leiðing sunnan fyri Hvítanes.

6. <u>**Kloakkir í Kirkjubø og á Velbastað**</u>
   Ætlanin er at samla allar kloakkir ávíkavist í Kirkjubø og á Velbastað í skipaðar leiðingar og út á sjógv. Hetta fyri at lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni.

Partur av arbeiðinum at skipa kloakkirnar er longu gjørt og fevnir arbeiðið um at skipa so fyri at útleiðingarnar lúka krøvini frá Umhvørvisstovuni við at leiðingarnar koma minst 1 m. undir størstu fjørðu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta:
5) kr. 150.000,- til projektering av kloakkum á Hvítanesi
6) kr. 250.000,- til projektering av kloakkum í Kirkjubø og Velbastað
   ella samanlagt kr. 400.000,- til tey 2 omanfyri standandi arbeiði av framfluttum íløgum fyri kloakkir fyri 2012 konto 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. november 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. november 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjektuppskot fyri Kirkjubø og Velbastað at savna allar kloakkir í skipaða leiðing út á streymasjógv er liðugt. Á Velbastað er ætlanin at savna tær núverandi 4 útleiðingar á sjógv í eina skipaða leiðing, sum verður veitt út á streymasjógv, so útleiðingin líkur krøvini frá Umhvørvisstovuni. Sí j.nr 15/03558.

Í Kirkjubø er ætlanin at savna allar kloakkirnar í verandi útleiðing á Sjógv. j.nr. 15/03200.

Ætlanin er, at fáa PB Consult gera prosjekt klárt til útbjóðing og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og leggja fyri nevnd aftur.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2016, kt. 6875 til gerð av útbjóðingartilfari.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkir fyri 2016 konto 6875 til at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Nevndin staðfestir, at játtaður peningur sambært samtykt 28. november 2013 er nýttur til støðulýsing/heildarætlan fyri økini á Hvítanesi, Kirkjubø og Velbastað og ikki til projektering.
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.
Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekt fyri Kirkjubø og Velbastað, at savna allar kloakkir í skipaða leiðing og leggja út á streymasjógv er liðugt og boðið út í innbodnari lisitatión j.nr 15/03558-9. Lisitatiónin varð hildin á skrivstovuni hjá PB-Consult 31. mars 2016, kl. 10.00. Inn komu 4 boð. Av teimum hevði Sp/f Maskingrevstur lægsta boð. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol saman við ráðgeva j.nr. 15/03558-15

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært fíggjarligu uppgerð j.nr. 15/03558-16 verður samlaði fíggjartørvurin fyri prosjekti kr. 2,3 mió. (v/6,25%MVG).
Samlaða upphæddin fyri markaðu íløgum 2016 er kr. 5,8 mió. á Konto 6875.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 2,3 mió. av íløgum fyri kloakkir 2016 konto 6875 og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd, og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L 68023, at savna allar leiðingar á Velbastað og í skipaða leiðing út á streymasjógv er liðug og avhendað, er staðfest eitt avlop álj. kr. 180.957,-

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at verkætlanin verður lokað og málið beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 28. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2017:** Kunnað varð um málið og málið beint í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina til kunningar.

Verkætlanin verður lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Kloakkir á Hvítanesi ad5). Prosjekt, at savna allar kloakkir á Hvítanesi í skipaðar leiðingar og út á streymasjógv, er liðugt prosjekterað. PB-Consult hevur saman við umsitingini gjørt prosjekt klárt til útboð.

Av tí at tøkur peningur ikki er til at seta arbeiðið í gongd, av markaðum íløgum fyri kloakkir 2019, konto 6875, verður verkætlanin lokað og løgd fyri nevnd aftur, tá peningur er settur av til íløguna.

Verkætlanin L 68022, Kloakkir á Hvítanesi, er uppgjørd og vísir eitt hall áljóðandi kr. 70.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at hall álj. kr. 70.000,- verður fíggjað av markaðum íløgum fyri kloakkir L00001 konto 6875. At málið verður lokað og beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Kunnað varð um málið.

# 78/19 Val av 5 limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 22/16 | 16/04639-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 226/17 | 16/04639-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 78/19 | 16/04639-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 18. desember 2013, § 4 skulu kommunurnar seta barnaverndarnevndir, ið verða valdar av kommunustýrinum. Í greinini er ásett, at í eini barnaverndarnevnd skulu vera í minsta lagi 3 limir og samsvarandi varalimir. Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu í minsta lagi hava eina viðkomandi miðallanga útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- og bygdarráð og hava eina revsivátttan.
Barnaverndarnevndin hevur síðan 2008 talt fimm nevndarlimir

Í 2012 vóru hesi vald**:** Ann Elisabeth Joensen, Poula Eidesgaard, Henrik Thomsen, Hjørdis Heindriksdóttir og Miriann Jacobsen. Tiltakslimir vóru: Eyðálvur Dimon, Bjarni Beder, Jóngerð Poulsen, Búi Brattaberg og Hildigunn Poulsen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:**

| Fastir limir | Varlimir |
|---|---|
| Súsanna Olsen | Róaldur Jákupsson |
| Maibritt Svabo Egholm | Búi Brattaberg |
| Jóannes Guttesen | Malan Eyðunsdóttir |
| Ann Elisabeth Joensen | Poula Eidesgaard |
| Henrik Thomsen | Eyðjálvur Dimon |

**Ískoyti:**
Sagt verður frá at Maibritt Svabo Egholm hevur boða frá, at hon tekur seg úr nevndini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja nýtt umboð í barnaverndarnevndina.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Vald varð Rúna Hansen.

**Ískoyti:**
Sagt verður frá at Rúna Hansen hevur boðað frá, at hon tekur seg úr nevndini.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin mælir til at velja nýtt umboð í barnaverndarnevndina.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Vald varð Marja Lund Gjógvará.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20.30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Bjørg Dam |
| | Odd Færø | |